LM-087/2020

Fylgiskjal 3

Annika Petersen

Fra: Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>
Sendt: 28. januar 2020 16:59
Til: Annika Petersen; VMR-Journal
Cc: SEV
Emne: SV: 2020.01.08 Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) til hoyringar
Vedhæftede filer: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) SEV.docx

Skeiv fíla var viðheft. Her kemur endaliga útgávan.

Fra: Hákun Djurhuus
Sendt: 28. januar 2020 16:33
Til: annikahenrikkahannap@uvmr.fo; uvmr@uvmr.fo
Cc: SEV <sev@sev.fo>
Emne: SV: 2020.01.08 Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) til hoyringar

Viðhefta fílan manglaði.

Fra: Hákun Djurhuus
Sendt: 28. januar 2020 15:59
Til: annikahenrikkahannap@uvmr.fo; uvmr@uvmr.fo
Cc: SEV <sev@sev.fo>
Emne: SV: 2020.01.08 Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) til hoyringar

Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) SEV.docx

Til Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Góðan dagin Annika Petersen

Viðfest er word-fíla av lógaruppskotinum, har SEV hevur skrivað viðmerkingarnar inn.

Vinalig heilsan
Elfelagið SEV
Hákun Djurhuus

Fra: SEV <sev@sev.fo>
Sendt: 9. januar 2020 14:10
Til: Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>
Emne: 2020.01.08 Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) til hoyringar

Fra: Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
Sendt: 8. januar 2020 08:55

LM-087/2020

Til: SEV <sev@sev.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; politi@politi.fo; FMA <fma@fma.fo>; BST Postur <bst@bst.fo>; us <us@us.fo>; Arbeiðseftirlitið <arb@arb.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; Vinnuhúsið <industry@industry.fo>; post@sorinskrivarin.fo
Cc: Sørin Pram Sørensen <SorinPramS@uvmr.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@uvmr.fo>; Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) til hoyringar

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin) verður hervið sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **hósdagin 30. januar 2020.**

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Bliðar heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

VERIÐ VARIN: Hesin teldupostur kemur uttani frá til SEV. Ikki trýsta á leinkjur ella opna viðlagdar fílir uttan so, at tú kennir sendara og veit, at innihaldið er trygt.

LM-087/2020

Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 9. desember 2019
Mál nr.: 20/00007
Málsviðgjørt: HH
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Uppskot til

Løgtingslóg
um
~~Uppskot til løgtingslóg um~~ elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Kapittul 1

Virkisoki og allýsingar

§ 1. Løgtingslógin er galdandi fyri elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar við so høgum spenningi ella stórari streymstyrki, sum vandi kann standast av. Løgtingslógin er eisini galdandi fyri elektriskt tilfar.

§ 2. Við elektriskan útbúnað skilst í hesi løgtingslóg allur útbúnaður til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi. Elektriskur útbúnaður fevnir bæði um háspenningsútbúnað og lágspenningsútbúnað og er ikki avmarkaður til spenningsmark.
Stk. 2. Við elektriska innlegging skilst í hesi løgtingslóg øll innleggingin frá elektriska útbúnaðinum fram til og við íbundið elektriskt tilfar og leiðingar, undantikið innleggingar umborð á skipum og aliflakum, á flytførum frálandaútbúnaði, umborð á flogførum umframt elektriskar innleggingar í motorakførum, sum eru ætlaðar sum drívmegi í motorakførum, undantikið løðistikkið til eldrivin motorakfør.
Stk. 3. Við elektriskt tilfar skilst í hesi løgtingslóg eitthvørt slag av tilfari, sum er partur av, ella er ætlað at verða partur av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging, ella sum skal setast til elektriska útbúnaðin ella elektrisku innleggingina, undantikið elektriskt tilfar sum er serliga roknað til nýtslu umborð á skipum og aliflakum, flytførum frálandaútbúnaði ella í flogførum, umframt elektriskt tilfar í motorakførum, ið er ætlað til rakstur av motorakfarinum, undantikið løðistikk, sum er ætlað sum partur av eldrivnum motorakførum.

Kommenterede [HD1]: Av yvirskipaðum viðmerkingum hava vit hesar:
1) Talan er um eina rammulóg. Harvið er vavið á hesum virkisokinum ikki neyvt ásett, tá ið tilhoyrandi kunngerðirnar og skiftisreglurnar ikki eru orðaðar í skrivandi løtu. Tað ber ti illa til at gera viðmerkingar til virkssemi, sum hendan lógin førir við sær og enn minni hvat tann avleiddi búskapurin (kostnaðurin) er av virkisokinum. Sum skili á lógaruppskotinum, skal allur kostnaður av hesum virkisokinum gjaldast av SEV. Tað er eitt ósunt princip at summi valda, meðan onnur gjalda. SEV dámar ikki eina skipanina, har man ikki hevur ávirkan á tær veitingar, sum man skal gjalda fyri. Mælt verður til at kunngerðirnar og skiftisreglurnar verða gjørdar og fyriliggja áðrenn lógaruppskotið verður viðgjørt, soleiðis at málið kann verða viðgjørt á einum upplýstum og forsvarligum grundarlagi. Hetta var eisini gjørt tá sterkstreymlóggávan var dagførd í 1993 og bæði uppskot til lógir og kunngerðir fyrilógu. Sambært lógaruppskotinum verður roknað við, at uppskot til kunngerðir kunnu verða sendar til ummælis seinni í hesum árinum. Undir øllum umstøðum eigur tað at vera soleiðis, at SEV verður við í arbeiðnum at orða kunngerðirnar og skiftisreglurnar. SEV bjóðar seg fram til at luttaka í hesum arbeiði á ein konstruktivan og skjótan hátt.
2) Rættlestur av uppskotinum manglar. Vit hava gjørt nakrar rættingar í sjálvum lógartekstinum og annars onkrar viðmerkingar hesum viðvíkjandi. Vit hava tó ikki gjørt samsvarandi viðmerkingar í lógarviðmerkingunum. Í onkrum føri verður við tilvising til "DK" vist til orðing í donsku lógini, har spurnartekin verður sett við, um umsetingin er nóg neyv.

Kommenterede [HD2]: Skip, aliflakar og flogfør fáa/fara at fáa "landstreym" eins og elbilar, tí eigur hetta at verða nevnt í lógini á sama hátt sum løðistikk til elbilar, at eitt væl definerað skilmark er/verður.

Kommenterede [HD3]: Skip, aliflakar og flogfør fáa/fara at fáa "landstreym" eins og elbilar, tí eigur hetta at verða nevnt í lógini á sama hátt sum løðistikk til elbilar, at eitt væl definerað skilmark er/verður.

LM-087/2020

Kapittul 2

Trygdarkrøv o.a.

§ 3. Elektriskur útbúnaður og elektriskar innleggingar skulu gerast og rekast á ein slíkan hátt, at hesar ikki eru til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

§ 4. Elektriskt tilfar skal verða framleitt á ein slíkan hátt, at tað, við rættari innlegging og viðlíkahaldi og við nýtslu í samsvari við endamálið við tí undir vanligum umstøðum, ikki er til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

§ 5. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um trygd fyri:

1) gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði,
2) gerð og rakstur av elektriskum innleggingum,
3) elektriskt tilfar, og
4) gerð og rakstur av øðrum útbúnaði í nærhendis ella í sambandi við elektriskan útbúnað ella elektriskar innleggingar.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta krav um skjalprógv viðvíkjandi gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum umframt elektriskum tilfari, sbr. stk. 1, nr. 1-3.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri elektriskt tilfar, sum er fevnt av ES-regulering.

§ 6. Elnevndin kann í serligum førum geva fráviksloyvi frá krøvum í reglum, settum við heimild í § 5, stk. 1. Elnevndin kann áseta treytir fyri fráviksloyvinum.
Stk. 2. Elnevndin kann í serligum førum, tá umstøðurnar gera tað neyðugt, seta serlig trygdarkrøv, sum víkja frá krøvum í reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 1, ella seta krøv um serligar merkingar ella vegleiðingar viðvíkjandi elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari.

Kapittul 3

Almennar skyldur o.a.

§ 7. Tann, ið ger ella rekur elektriskan útbúnað og elelektriskar innleggingar, skal fylgja reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1 og 2. Verður í reglum, ið eru ásettar sbrt. hesum, víst til standardir, verður trygdarkravið í § 3 mett lokið, um ásettu reglurnar og teir standardir, sum reglurnar vísa til, eru fylgd.
Stk. 2. Verða standardir, sum nevndir í stk. 1, ikki ella bert lutvíst nýttir, skal tað kunna skjalprógvast á hvønn hátt, ið trygdarkravið í § 3 er lokið. Skjalprógvanin skal fyriliggja á føroyskum, donskum ella enskum.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um skjalprógvan eftir stk. 2.

§ 8. Tann, ið framleiðir elektriskt tilfar, sum ikki er fevnt av reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 3, skal fylgja reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3. Er tað í reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3, víst til standardir, verður trygdarkravið í § 4 mett at vera lokið, um ásettu reglurnar og teir standardir, sum reglurnar vísa til, eru fylgd.
Stk. 2. Verða standardir, sum nevndir í stk. 1, ikki ella bert lutvíst nýttir, skal skjalprógvast, á hvønn hátt trygdarkravið í § 4 er lokið. Skjalprógvanin skal fyriliggja á føroyskum, donskum ella enskum.
Stk. 3. Tann, ið framleiðir ella innflytur elektriskt tilfar til Føroyar, hevur ábyrgd av, at allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri, at elektriska tilfarið kann verða nýtt samsvarandi sínum endamáli uttan at elva til vanda, eru settar sjónliga á elektriska tilfarið. Ber hetta ikki til, skulu upplýsingarnar síggjast í vegleiðing, ið er løgd við. Upplýsingarnar skulu vera á føroyskum, donskum ella enskum.
Stk. 4. Tann, ið framleiðir ella innflytur elektriskt tilfar sum samlisett til Føroyar, hevur ábyrgd av, at vegleiðing fylgir við,

Kommenterede [HD4]: DK: "forudsetige forhold"?

Kommenterede [HD5]: Tíðarfreist skal ásetast, møguliga í kunngerð.

Kommenterede [HD6]: Á hvørjum máli?

soleiðis at elektriska tilfarið lýkur § 4, um vegleiðingin verður fylgd. Hetta sama er galdandi fyri fylgilutir til elektriska tilfarið.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um skjalprógvan eftir stk. 2.

§ 9. Eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði hevur ábyrgd av, at elektriski útbúnaðurin lýkur reglur, ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1, umframt trygdarkravið í § 3.
Stk. 2. Eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði hevur ábyrgd av, at útbúnaðurin verður rikin og hildin við líka á fullgóðan hátt samsvarandi reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1. Eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði skal eisini fáa í rættlag feilir og manglar skjótast gjørligt, umframt skjótast gjørligt seta tiltøk í verk fyri at forða fyri, at feilir og manglar kunnu hava við sær vanda, sbr. § 3.
Stk. 3. Eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði skal vísa ansni fyri at forða fyri, at útbúnaðurin verður yvirlastaður.

§ 10. Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging hevur ábyrgdina av, at innleggingin lýkur reglur, ásettum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 2, umframt trygdarkravið í § 3.
Stk. 2. Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging hevur ábyrgd av, at innleggingin verður rikin og viðlikahildin á fullgóðan hátt samsvarandi reglum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 2. Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging skal eisini fáa í rættlag feilir og manglar skjótast gjørligt, umframt skjótast gjørligt seta tiltøk í verk til tess at forða fyri, at feilir og manglar kunnu hava við sær vanda, sbr. § 3.
Stk. 3. Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging skal vísa ansni til tess at forða fyri, at innleggingin verður yvirlastað.

§ 11. Tann, ið rekur ein elektriskan útbúnað til at býta elektriska orku, kann ikki, sum treyt fyri at veita elektrisitet til brúkaran, seta strangari trygdarkrøv enn tey, ið fylgja av reglum, ásettum sbrt. § 5, stk. 1.

§ 12. Tann, ið rekur ein elektriskan útbúnað, skal rinda endurgjald fyri skaða á persón ella góðs, sum útbúnaðurin er atvold til, uttan so, at tað verður prógvað, at sloppið kundi ikki verið undan skaðanum við tí ansni og nærlagni, sum rakstur av slíkum útbúnaði krevur.
Stk. 2. Um skaðin er voldur av fleiri elektriskum útbúnaðum, hefta øll, ið reka útbúnaðirnar, samhaldsfast mótvegis tí, ið hevur verið fyri skaða, uttan so, at tann, ið rekur ein av hesum útbúnaðunum, kann prógva, at skaðin ikki kann vera elvdur av hesum útbúnaðinum. Tey, ið reka skaðaelvandi útbúnað, hefta javnbjóðis fyri at rinda endurgjaldið, um onnur avtala ikki er gjørd.

Kommenterede [HD9]: DK: "kan skaden skyldes flere"?

Kommenterede [HD7]: DK: "forsvarligt"?

Kapittul 4

Eftirlit

§ 13. Elnevndin hevur eftirlit við, at henda løgtingslógin og reglur, settar sbrt. løgtingslógini, verða hildnar.
Stk. 2. Elnevndin kann krevja at fáa allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at fremja eftirlitið sbrt. stk. 1. Upplýsingarnar kunnu útvegast við at venda sær til fyritøkur ella persónar, ið projektera, reka og gera elektriskan útbúnað ella elektriskar innleggingar, eigarar og brúkarar av elektriskum útbúnaðum ella elektriskum innleggingum, umframt øll umsetningarlið av elektriskum tilfari.
Stk. 3. Elnevndin ella myndugleikar, netfelag ella privatar fyritøkur, sum eru heimilað sbrt. § 23, stk. 1, kunnu ikki lata øðrum upplýsingar um, at Elnevndin hevur fingið fráboðan frá einum arbeiðstakara ella hansara umboðsfólki.

Kommenterede [HD8]: DK: "forsvarligt"?

§ 14. Elnevndin, ella myndugleiki ella felag, sum eru heimilað sbrt. § 23, hava til eina og hvørja tíð við viðkomandi samleikaprógvi og uttan rættarúrskurð atgongd til almennar og privatar ognir og støð til fyri at útvega upplýsingar, ið skulu brúkast til eftirlit samhærtvið hesi lóg.

Stk. 2. Um neyðugt, veitir løgreglan Elnevndini stuðul til hetta.

§ 15. Elnevndin kann geva boð um, at eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging letur løggildaðað elinnleggjarafyritøku fremja eftirlit av útbúnaðinum ella av innleggingini fyri rokning eigarans ella brúkarans.

§ 16. Elnevndin kann geva eigaranum ella brúkaranum av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging boð um at bøta um feilir og manglar við útbúnaðinum ella innleggingini fyri rokning eigarans ella brúkarans.

§ 17. Elnevndin kann seta forboð fyri nýtslu av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum, ið ikki halda reglur ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2 ella trygdarkravið í § 3.
Stk. 2. Verður framt brot á forboð eftir stk. 1, kann Elnevndin lata elveitingina til viðkomandi útbúnað ella viðkomandi innlegging slita fyri rokning eigarans ella brúkarans. Elnevndin kann geva netfelagnum boð um at slíta elveitingina, um forboð eftir stk. 1 verður brotið.
Stk. 3. Elnevndin kann krevja, at kostnaðir av at slíta elveitingina verða endurrindaðir av tí, ið er álagdur forboð eftir stk. 1.

§ 18. Elnevndin kann uttan at rinda fyri tað, taka elektriskt tilfar út til nýtslu í eftirlitinum eftir § 13, stk. 1.
Stk. 2. Elnevndin kann gera ella lata gera tekniska kanning av elektriskum tilfari, sum tikið út eftir stk. 1. Elnevndin kann krevja, at kostnaðir av uttanhýsis kanningum verða endurrindaðir av tí, sum í sambandi við kanningina fær fráboðað álegging ella forboð eftir §§ 19 og 20, stk. 1-2.

§ 19. Elnevndin kann geva boð um, at bøtt verður um feilir og manglar við elektriskum tilfari, ið ikki heldur reglur, ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3 ella trygdarkravið í § 4.

§ 20. Elnevndin kann seta forboð fyri sølu, útflýggjan, innlegging ella bróki av elektriskum tilfari, ið ikki heldur reglur, ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3, ella trygdarkravið í § 4.
Stk. 2. Elnevndin kann geva boð um, at elektriskt tilfar, sum er fevnt av forboði eftir stk. 1, verður tikið aftur frá marknaðinum, verður afturkallað frá brúkarum ella verður fyribeint.
Stk. 3. Elnevndin kann geva boð um, at elektriskt tilfar, sum er fevnt av forboði eftir stk. 1, verður koplað frá.
Stk. 4. Verða boð eftir stk. 3 ikki hildin, kann Elnevndin geva eini løggildari innleggjarafyritøku boð um at frákopla elektriska tilfarið, um tað er fast innlagt. Elnevndin kann krevja kostnaðin av frákopling endurrindaðan av tí, sum hevur fingið fráboðan um boð eftir stk. 3.

§ 21. Elnevndin kann geva tí, ið hevur fingið fráboðað undantaksloyvi eftir treytum eftir § 6, stk. 1, boð um at halda hesar.

§ 22. Elnevndin kann upplýsa almenningin um vandan við elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari, tá tað er fráboðað boð ella forboð eftir §§ 15 og 16, § 17, stk. 1, § 19 og § 20, stk. 1 og 2.
Stk. 2. Við kunning eftir stk. 1 kann Elnevndin einans geva viðari upplýsingar, sum hava eyðkenni av handilsloynidómum, tá hetta verður mett neyðugt fyri at verja trygdina hjá brúkarunum.

§ 23. Elnevndin kann, við góðkenning frá landstýrismanninum, heimila øðrum myndugleikum, netfelagi ella ~~øðrum~~ privatum fyritøkum, at:

1) fremja eftirlitsuppgávur eftir § 13, stk. 1 og 2,

Kommenterede [HD10]: Hvussu við talgildum samskifti til og frá Elnevndini og/ella øðrum myndugleikum, netfelagi ella privatum fyritøkum, ið hava fingið heimild sambært hesi lóg?

Kommenterede [HD11]: Sostatt merkir hetta, at um SEV skal halda fram við sínum eftirlitsvirksemi ella skal viðka um hetta, so skal avtala gerast millum Elnevndina og SEV um tað. Uttan mun til um tað er SEV ella onnur, sum framefter skulu taka sær av hesum viðurskiftum, má hædd takast fyri, at tað tekur tíð at fyriskipa hetta.

2) hjálpa Elnevndini at fremja eftirlitsuppgávur eftir § 13, stk. 1, ella
3) geva boð ella seta forboð eftir §§ 15 og 16, § 17, stk. 1, § 19 og § 20, stk. 1 og 2.

Stk. 2. Elnevndin kann í sambandi við eina heimilan eftir stk. 1 seta krav um, at myndugleikin, netfelagið ella privata fyritøkan er akreditterað av Den Danske Akkrediteringsfond, DANAK. Viðkomandi myndugleiki, netfelag ella fyritøka skal gjalda fyri kostnaðir í sambandi við akkredittering.

Stk. 3. Elnevndin kann, í sambandi við heimilan eftir stk. 1, seta krøv um gegni, um tekniskar førleikar og um ábyrgdartrygging. Elnevndin kann eisini seta krav um, at boð ella forboð fevna um upplýsingar um kærumøguleikar sbr. § 37, stk. 2.

Stk. 4. Starvsfólk hjá myndugleikum, netfelagi og fyritøkum, ið eru heimilað sbrt. stk. 1, hava tagnarskyldu sbrt. §§ 152-152 f í revsilógini.

Kapittul 5

Elnevndin

§ 24. Nevndin røkir tær uppgávur, ið eru álagdar nevndini í hesi løgtingslóg ella í reglum, settum sbrt. løgtingslógini. Elnevndin skal umframt vera landsstýrismanninum til hjálpar í neyðugan mun við ráðum o.s.fr. í spurningum, sum koma undir hesa løgtingslóg.

Stk. 2. Elnevndin er samansett av formanni, ið skal vera løgfrøðingur, rakstrarleiðaranum í netfelagnum, stjóranum á Landsverki, einum góðkendum elinnleggjara, sum Føroya Handverksmeistarafelag tilnevnir, og einum limi við elfrøðiligari útbúgving. Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin og seinast nevnda lim.

Stk. 3. Nevndarlimunum kann verða veitt árlig samsýning, og fáa teir endurgjald fyri skjalprógvaðar ferðaútreiðslur. Teir limir, sum ikki fáa samsýning, fáa dagpening samsvarandi landsstýrisins reglum um samsýning til limir í nevndum, ráðum o.ø.

Stk. 4. Nevndin ger uppskot til starvsskipan, ið landsstýrismaðurin skal góðkenna.

Stk. 5. Nevndin kann fáa sær neyðug hjálparfólk.

Stk. 6. Undir Elnevndini er avgreiðsluskrivstova, sum eftir nærri avgerð nevndarinnar og góðkenning landsstýrimansins, kann verða løgd til netfelag, ella annan almennan myndugleika.

Kapittul 6

Órógv á raksturin av øðrum virkjum

§ 25. Elektriskur útbúnaður skal ikki órógva raksturin av øðrum virkjum, ið eru. Slepst undan hesum órógvi við at seta í verk trygdartiltøk, verða hesi gjørd fyri kostnað tess virkiseigara, nýtara, ið hevur verið atvold í órógvunum. Hini virkini skulu tó bera ein hóskandi part av útreiðslunum, um tiltøkini, ið verða sett í verk, føra við sær munandi fyrimunir fyri rakstur teirra.

Stk. 2. Um semja ikki fæst, verða hesir spurningar avgjørdir av serligari nevnd. Tað snýr seg um,

1) hvørji trygdartiltøk skulu verða tikin til tess at útihýsa órógvinum,
2) hvørt vitt ein elektriskur útbúnaður ger, at raksturin av verandi virki verður fyri órógvi,
3) hvør ið skal seta trygdartiltøkini í verk, og
4) um og í hvønn mun hini virkini skulu bera útreiðslurnar í sambandi við hetta.

Stk. 3. Avgerð nevndarinnar eftir stk. 2 er endalig og bindandi fyri partarnar.

Stk. 4. Nevndin kann gera av, at ikki kann verða farið undir bygging ella rakstur av elektriska útbúnaðinum, fyrr enn tey trygdartiltøk, sum verða hildin neyðug, eru framd.

Kommenterede [HD12]: Hvussu við nevndarlimunum og starvsfólkum hjá Elnevndini?

Kommenterede [HD13]: Man kann umhugsa, at 1) netfelagið, 2) Landsverk, 3) Føroya Handsverksmeistarafelag hvør kunnu tilnevna skikkað umboð innan teirra fyritøkur/stovnar. Hesir og hinir tilnevndu nevndarlimirnir kundu verið tilnevnd fyri eitt avmarkað tíðarskeið og við møguleikum fyri nýggjari tilnevning.

Kommenterede [HD14]: Hetta heiti finst ikki sambært nýggju lógini.

Stk. 5. Í úrskurðinum ásetir nevndin, hvør av pørtunum skal bera kostnaðin av nevndarviðgerðini av málinum og við hvørjari upphædd.
Stk. 6. Tann serliga nevndin er samansett av sorinskrivaranum ella einum av fulltrúum hansara sum formanni og 2 øðrum limum, ið verða tilnevndir frá einum máli til annað av Elnevndini uttan um teir.

Kapittul 7

Ognartøka

§ 26. Elektriskar leiðingar kunnu verða leiddar yvir og undir gøtur og vegir, tá ið tær kunna verða lagdar uttan ampa fyri ferðsluna.
Stk. 2. Áðrenn farið verður undir arbeiðið, skal verða boðað eigaranum av vegnum frá hesum 4 vikur frammanundan. Eigarin av vegnum kann innan 3 vikur aftan á fráboðanina mótmæla, at leiðingarnar verða leiddar, til Elnevndina.
Stk. 3. Aftan á tinging við partarnar, løgregluna og vegamyndugleikan ger Elnevndin endaliga av, um og á hvønn hátt leiðingarnar kunnu verða leiddar.
Stk. 4. Um Elnevndin metir, at tað at føra fram leiðingar fer at hava við sær figgjarligan miss hjá eigaranum av vegnum, ella um elsteyrar, stengur o.til. skulu setast upp á vegaøkinum, skal verða farið fram eftir reglunum í §§ 27-342.

§ 27. Tá ið almannagagnið krevur tað, kann landsstýrismaðurin loyva, at farið verur undir ognartøku viðvíkjandi fastari ogn eftir reglunum í hesi grein, sbr. §§ 29-323, til at leggja undir ella oman á jørð leiðingar við mastrum, transformarastøðum o.tíl., ið hoyra til, tá ið útbúnaðurin er ætlaður til býti av elmegi til spenningar niðan fyri 50kV72kV.
Stk. 2. Um landsstýrismaðurin ikki beinavegin sýtir umsókn eftir 1. stk., letur landsstýrismaðurin Elnevndini málið til kanningar og ummælis.
Stk. 3. Elnevndin sær til, at eigarar og nýtarar av teimum økjum, ið munnu ætlast at verða nervað av tí ætlaða útbúnaðinum, við innskrivaðum brævi fáa boð um umsóknina og um hvørji rættindi, ið ynskt verða. Samstundis verður mælt teimum til innan 3 vikur, aftan á at boðini eru send, at seta fram tær atfinningar, teir hava móti umsóknini. Somuleiðis verður at boða kommunustýrunum í teimum kommunum, sum útbúnaðurin nemur við, frá.
Stk. 4. Elnevndin kunnger 2 reisur í landsumfatandi almennum blað ella bløðum, at umsóknin er fingin og við tilskilan av innihaldinum í umsóknini, og hvørji rættindi ynskt verður at fáa. Ein og hvør, ið hevur rættarligan áhuga at røkja í sambandi við umsóknina, og sum ikki serstakliga hevur fingið boð, sbr. stk. 3, verður biðin innan 3 vikur frá seinastu kunngerð í almennum landsumfatandi blað ella bløðum at seta fram sínar viðmerkingar fyri Elnevndini.
Stk. 5. Umsøkjarin skal geva Elnevndini allar tær upplýsingar um útbúnaðin og rakstur tess, sum verða mettar ø-neyðugar til meting av umsóknini.
Stk. 6. Elnevndin gevur ummæli til landsstýrismannin, sum ger av, hvørt umsóknin kann verða játtað.

§ 28. Við atliti at gerð av útbúnaðum, sum koma undir § 27, hevur tann, ið eigur býtisútbúnaðin, heimild at gera neyðugar fyrireikandi uppmátingar og onnur tøknilig fyrireikingararbeiði og kanningar.
Stk. 2. Til at føra undir tey fyrireikingararbeiðir og tær kanningar, sum nevndar eru í stk. 1, skulu teir avvarðandi eigarar og nýtarar í minsta lagi 14 dagar frammanundan fáa serstakt boð um hetta. Ber hetta ikki til, verður kunngjørt soleiðis, sum mett verður hóskandi á staðnum.
Stk. 3. Teir skaðar, ið standast av arbeiðinum, skulu verða endurgoldnir. Fæst ikki friðarsemja um støddina á endurgjaldinum, verður hetta ásett av Elnevndini.

Stk. 4. Tann, ið við vilja tekur burtur avlagar ella løstar merkingar, sum verða gjørdar í sambandi við fyrireikingararbeiðini, verður revsaður við bót, uttan so, at strangari revsing er uppiborin eftir revsilógini.

§ 29. Tá ið landsstýrismaðurin eftir § 27 hevur givið loyvi til ognartøku viðv. fastari ogn, boðar Elnevndin bæði tí ella teimum, ið hava fingið loyvi, og eigarum og nýtarum av tí føstu ognini til fundar á avvarðandi økinum, ella har nevndin heldur hóskandi. Fráboðan um fundin verður við 14 daga freist latin við innskrivaðum brævi ella við stevningarmonnunum. Nevndin ger av, hvørjir av hennara limum skulu luttaka.
Stk. 2. Á fundinum tingast Elnevndin við partarnar um ta gjøllari skipanina. Fæst ikki semja, ella koma ikki allir av eigarunum ella nýtarunum á fundin, ásetir nevndin innan karmin av loyvi landsstýrismansins innihaldið og víddina av teimum rættindum á hvørjari ogn sær, ið verður at ognast, meðan spurningurin um støddina á endurgjaldinum verður skotin inn fyri gerðarrætt til ásetingar, sbr.

§ 30. Elnevndin kann gera av, at tann ella teir, sum hava fingið loyvið, skulu veita trygd fyri greiðslu av endurgjaldinum, áðrenn arbeiðið byrjar. Verður ikki semja millum partarnar, ger Elnevndin av, í hvørjum peningastovni trygdin verður latin til varðveitslu.

§ 30. Gerðarrætturin, sbr. § 29, stk. 2, hevur 2 limir. Tann ella teir, sum hava fingið loyvi sbr. § 27, og fastognareigararnir ella nýtararnir velja hvør sín lim. Um annar parturin ikki skrivliga hevur sagt hinum partinum frá sínum vali innan 14 dagar aftan á, at hin seinri hevur boðað frá sínum vali, missir hin fyrri sín rætt til at velja sín lim, soleiðis at hin parturin eisini hevur rætt at velja hin limin.
Stk. 2. Um gerðarrætturin ikki kann semjast, tilnevnir sorinskrivarin (dómarin) ein ástoðumann. Ástoðumaðurin ger av innan fyri markið av teimum ósambærligu áskoðanum teir spurningar, ið ósemjan er um.
Stk. 3. Úrskurðurin hjá gerðarrættinum verður fráboðaður báðum pørtum skrivliga. Úrskurðurin kann ikki verða skotin inn fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.

§ 31. Upphæddin, sum eigarin av útbúnaðinum skal gjalda í endurgjaldi, verður at rinda avvarðandi eigara ella nýtara beinleiðis. Eigarin av útbúnaðinum hevur tó heimild til, áðrenn endurgjaldsupphæddin verður útgoldin, at krevja neyðuga sannan um, at veðhavarar, sum hava tinglýstan rætt, og onnur avvarðandi samtykkja í útgjaldingini, og til slík sannan er til skjals, at lata endurgjaldsupphæddina í varðveitslu í peningastovni við tí avleiðing, at upphæddin við aftratkomnari rentu ikki kann verða tikin út uttan samtykki frá báðum pørtum.

§ 32. Sum prógv um, at rættindi til ogn hjá øðrum persóni er fingin, er úrskrift av tí, ið farið er fram í Elnevndini. Úrskriftina kann eigarin av útbúnaðinum lata tinglýsa sum skuldbinding í ognini.

formaterede: Skrifttype: Ikke Fed

§ 33. Tá ið almannagagnið krevur tað, kann landsstýrismaðurin aftan á at hava fingið ummæli frá Elnevndini, loyva, at sett verður í verk ognartøka viðvíkjandi fastogn eftir reglunum í lov nr. 69 af 7. maj 1881om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder, samt til offentlige skoler på Færøerne" við seinni broytingum, til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi.

Kommenterede [HD15]: Hendan rætting eigur eisini at verða gjørd niðanfyri

Stk. 2. Ognartøka sbr. stk. 1 kann fara fram til nýggjar útbúnaðir, til at vaksa um og broyta útbúnaðir, sum eru, til tryggingar av, at slíkir útbúnaðir verða verandi, til neyðug eyka tiltøk og vegna brúk, rokt, trygt virksemi og hóskiligan rakstur av teimum nevndu útbúnaðum, heruppí t.d. til

orkustoðir, transformarastoðir, umformarastoðir, goymsluoki, ruskoki og leiðingar omaná og undir jørð við mastrum, id hoyra til, og oðrum tilhoyri.Ognartøka sbr. 1. stk. kann eisini fara fram til teir útbúnaðir, id nevndir eru í § 27, stk. 1.
Stk. 3. Í einari avtalu um avhending av rættindum yvir fastari ogn til útbúnaðir, sum ikki koma undir § 27, stk. 1, kann verða avgjørt, at gerðarrætturin, nevndur er í § 30, ásetir endurgjald fyri avhending. Avgerðin hjá gerðarrættinum kann tá verða viðgjørd við yvirmeting eftir reglunum í § 4 í lov om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder, samt til offentlige skoler på Færøerne.
Stk. 4. Reglurnar í § 28 um fyrireikandi uppmátingar hjá útbúnaðarhavaranum og onnur tøknilig fyrireikandi arbeiði og kanningar o.s.fr. verða nýttar samsvarandi.
Stk. 5. Við ognartøku av lendi í sambandi við nýtslu av vatnorku til elframleiðslu verða nýttar reglurnar í "lov nr. 169 af 18. maj 1937 for Færøerne om benyttelse af indsøer og vandløb" við seinni broytingum.

§ 34. Eigarin av útbúnaðinum ber allan kostnað av tí starvsemi við meira, sum nevnt er í §§ 26-33, heruppií dagpening og ferðaútreiðslur til limirnar í gerðarrættinum, sbr. § 30, eftir reglum landsstýrisins um samsýning til limir í nevndum, ráðum o.ø.

Kapittul 8

Undantøka frá kunngerð í Kunngerðaportalinum

§ 35. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fyriskipanir, ið eru settar í gildi sbrt. hesi løgtingslóg, sum innihalda krøv til fyritøkur, elektriskar útbúnaðir, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar o.tíl. og tekniskar nágreiningar, sum verða vístar til í slíkum fyriskipanum, ikki verða kunngjørdar í Kunngerðarblaðnum.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um, hvussu upplýsingar um innihaldið í fyriskipanum og tekniskum nágreiningum, sum ikki verða lýstar í Kunngerðarblaðnum, sbr. stk. 1, skal almannakunngerast.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at tekniskar nágreiningar, sum ikki verða lýstar í Kunngerðarblaðnum, sbr. stk. 1, skulu vera galdandi, hóast hesar ikki eru á føroyskum ella donskum.

Kapittul 9

Figging

§ 36. Í tann mun, tær ikki verða rindaðar av gjøldum o.a., skal fyritøkan, sum hevur netloyvi eftir løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, rinda eitt árligt gjald til figging av útreiðslunum til umsitingina av hesi løgtingslóg.
Stk. 2. Gjaldið, sum verður kravt frá netfelagnum, verður játtað á løgtingsfiggjarlógini.

Kapittul 10

Kærumoguleikar

§ 37. Avgerðir, ið Elnevndin hevur tikið eftir hesi løgtingslóg ella reglum, settum sbrt. løgtingslógini, kunnu ikki leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika.
Stk. 2. Kærur um avgerðir, tiknar av ti, sum Elnevndin hevur heimilað sbrt. § 23, stk. 1, kunnu leggjast fyri Elnevndina.
Stk. 3. Freistin at senda inn kæru, sum nevnt í stk. 2, er 4 vikur at rokna frá, at kæran er fráboðað viðkomandi.

Kapittul 11

Revsiásetingar

§ 38. Um ikki strangari revsing er uppiborin sbrt. aðrari lóggávu, verður tann sektaður við bót, ið
1) tilætlað brýtur §§ 3 ella 4,

Kommenterede [HD16]: Sambært galdandi lóg

Kommenterede [HD18]: Verandi kostnaður hjá SEV at umsita øki er mettur til umleið 3 mió. kr. árliga. Sambært viðmerkingunum er ikki gjørd nøkur nýggj meting av kostnaðinum av at umsita øki sambært hesum lógaruppskotinum. Upplýsast kann, at í 2011 arbeiddu Elnevndin og SEV í felag saman við Vinnumálaráðnum við at dagføra hetta virkisøki. Leysliga bleiv tá mett, at hetta fór í minsta lagi at kosta 4,5 mió. kr. árliga. Tá var t.d. ikki tikið við øki ognartøka (Landsverk). Mælt verður til at greiða verður fingin á hvussu øki skal skipast harundir hvør skal gera hvat, uppskot til kunngerðir verða gjørdar og at nýggj meting verður gjørd av kostnaðinum av at umsita øki í sambandi við lógaruppskotið verður viðgjørt
Hvørji gjøld verður hugsað um og við hvørjari heimild verða hesi kravd?

formaterede: Skriftype: Fed

Kommenterede [HD19]: Gingið verður út frá, at hesar avgerðir ikki kunna kærast til Vinnukærunevndina?

Kommenterede [HD20]: Avgerðin?

Kommenterede [HD21R20]:

Kommenterede [HD17]: DK: "m.v."?

2) setir til viks upplýsingarskylduna í § 13, stk. 2, ella
3) ikki aktar eini boð ella brýtur forboð eftir §§ 15 og 16, § 17, stk. 1 og 2, § 19, § 20, stk. 1-4 og § 21.

Stk. 2. Í fyriskipanum, ásettar sbrt. § 5, kann sektarrevsing ásetast fyri brot á ásetingar í fyriskipanunum.

Stk. 3. Málini verða viðgjørd sum politimál. Tey í rættargangslógini nevndu tiltøk í kapitli 69 um handtøku, kapitli 70 um fongsling, kapitli 72 um rannsókn og kapitli 73 um inndrátt kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

§ 39. Feløgum o.ø. løgfrøðiligum persónum kann áleggjast revsiábyrgd sbrt. reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

§ 40. Fyrningarfreistin fyri revsiábyrgd er 10 ár.

Kapittul 12

Gildiskoma

§ 41. Løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2021, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 134 frá 10. juni 1993 um sterkstreymsútbúnað.

§ 42. Reglur, ið eru settar í gildi sbrt. løgtingslóg nr. 134 frá 10. juni 1993 um sterkstreymsútbúnað, verða verandi í gildi, til tær verða strikaðar, ella aðrar settar í staðin sbrt. hesi løgtingslóg, sbr. tó stk. 2.

Stk. 2. Samstundis, sum hendan lóg fær gildi, fara úr gildi:

1) kunngerð nr. 173 frá 21. september 1993 um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð v.m.; og
2) kunngerð nr. 171 frá 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari.

§ 43. Landsstýrismaðurin kann áseta skiftisreglur.

Kommenterede [HD22]: Hetta er ikki nøktandi, tí alt hetta virkisøki skal náa at umstilla seg. Umstillingin kann illa gerast, tá ið man ikki kennir innihaldið í kunngerðunum, harundir veit hvør skal taka sær av hvørjum.

Kommenterede [HD23]: Er hendan ikki sett úr gildi við kunngerð nr. 117 frá 19. juni 2019 um sterkstreymsregluger o.a.?

formateret: Skrifttype: Fed

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Galdandi lóggáva á eltrygdarøkinum er løgtingslóg nr. 134 frá 10. juni 1993 um sterkstreymsútbúnað, øgtingslóg nr. 142 frá 10. juni 1993 um løggilding av elinnleggjarum v. m.l

Lóggávan er ongantið broytt, síðani hon varð sett í gildi í 1993, og hevur sostatt verið óbroytt í gildi í meira enn 25 ár. Hetta í sjálvum sær ger, at tørvur er á at endurskoða lóggávuna.

Tann í Danmark til hvørj tíð galdandi sterkstreymsreglugerð er við heimild í sterkstreymslógini sett í gildi í Føroyum.

Við nýggjari lóggávu á økinum í Danmark (Elsikkerhedsloven, sum kom í gildi 1. januar 2016) er sterkstreymsreglugerðin sett úr gildi, tó við skiftisskipanum. Í Føroyum er reglugerðin fyrbils í gildi, til nýggjar reglur verða settar í gildi, sbr. fráboðan frá Elnevndini fráboðan frá Elnevndini 27. juni 2017.

Tær umfatandi og nágreiniligu trygdarteknisku ásetingarnar (konstruksjónsforskriftirnar) og fyrisitingarligu reglurnar í sterkstreymsreglugerðini eru avgerandi fyri, at lógin kann virka eftir sínum endamáli, nevniliga at elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar ikki skal vera til vanda fyri persónar, húsdjór og ogn.

Neyðugt er tí, at nýggjar reglur verða settar í gildi í staðin fyri konstruksjónsforskriftirnar og fyrisitingarligu reglurnar í sterkstreymsreglugerðini, fyri at lóggávan á økinum kann virka eftir ætlan, og fyri at vinnan ikki skal vera í óvissu um, hvørjar reglur galda og fara at galda frameftir.

Elnevndin hevur sostatt mælt til, at gjørd verður nýggj lóg, løgtingslóg um elektriskan útbúnað elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (eltrygdarlógin).

Løggildingarlógin varð sett í gildi í 1993, samstundis um sterkstreymlógin og hevur, burtursæð frá smærri broyting, verið óbroytt í gildi síðani tað. Tørvur er tí á eisini at dagføra ta lógina umframt, at tað eiga at verða settar reglur í lógina um m.a. góðskuleiðlsuskipan, fyri at fáa betri samsvar við uppskotið til nýggja sterkstreymslóg, t.e. serliga kravið í uppskotinum um serliga skjalprógvan, um ein innleging ikki verður gjørd eftir evropiskum ella altjóða standardum.

Uppskotið til eltrygdarlóg varð lagt fyri Løgtingið seinastu tingsetu, men varð ikki liðugt viðgjørt í tinginum, áðrenn tingið fór heim áðrenn løgtingsvalið, og fall tí burtur. Tað er sama uppskot, sum nú verður lagt framaftur, tó við ávísum tillagingum.

Samstundis við hesum verður eisini lagt fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarafyritøkum.

LM-087/2020

1.2. Galdandi lóggáva

1.2.1. Alment

Elektriskur útbúnaður og elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar hava í størri ella minni mun við sær slíkan váða fyri brúkarar av eleltrisiteti og tey sum arbeiða við tílkum útbúnaði, at tað má fyriskipast ein røð av trygdartiltøkum, sum skulu fylgjast í sambandi við gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum og eftirlit við útbúnaðinum og innleggingunum.

Fyri at tryggja, at elektriskt tilfar, sum er ella er ætlað at verða bundið í elektriska innlegging, og sum flest fólk nýta gerandisliga, hevur ávíst støði og lýkur grundleggjandi konstrukjónskrøv, er eisini neyðugt at áseta reglur um gerð og nýtslu av elektriskum tilfari og reglur um eftirlit við tí.

Sterkstreymslóggávan varð dagførd í 1993. Lógaruppskotið, løgtingsmál 132/1992 Sterkstreymslóggávan, bygdi á álit frá 1993 "Uppskot til sterkstreymslóggávu v.m. fyri Føroyar" og uppskot til lóggávu frá táverandi Elnevnd.

Uppskotið til nýggja lóggávu var í tveimum. Uppskot til løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað og uppskot til løgtingslóg um løggilding av elinnleggjarum, sum uttan broytingar vórðu samtyktar í Løgtinginum.

Sterkstreymslógin er rammulóg. Lógin heimilar landsstýrismanninum at seta itøkligar og nágreiniligar ásetingar á øllum økjum fyri framleiðslu, flutningi og býti av elektriskari orku, fyri innleggingar og fyri gerð og nýtslu av elektriskum tilfari og um eftirlit við, at ásetingar í lógini og í ásetingum, settum sbrt. lógini, verða hildnar.

Harumframt inniheldur lógin reglur um endurgjald í sambandi við skaða, elvdur av sterkstreymsútbúnaði, og reglur um ognartøku til útbúnað til framleiðslu, flutning og býti av elektriskari orku og reglur um trygdartiltøk, fyri at sleppa undan órógvi á raksturin av øðrum fyritøkum.

1.2.2. Sterkstreymsreglugerðin

Sterkstreymslógin heimilar, at tær teknisku trygdarreglurnar (konstruksjónsforskiftirnar), sum danska Elektricitetsrådet, nú Sikkerhedsstyrelsen, til eina og hvørja tíð ger í eini sterkstreymsreglugerð, heilt ella lutvíst skulu galda í Føroyum.

Sterkstreymreglugerðin varð sett í gildi í Føroyum við kunngerð nr. 173 frá 21. september 1993 um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð v.m.

Sterkstreymsreglugerðin er eitt savningarhugtak, sum fevnir um eina røð av einstøkum kunngerðum, sum innihalda ein ella fleiri partar av sterkstreymsreglugerðini. Talan er um eitt umfatandi tekniskt regluverk.

Við verandi skipan er talan um sera nágreiniliga regulering. Sterkstreymsreglugerðin fevnir í dag bæði um reglur fyri elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar. Hon er grundað á evropiskar ella altjóða standardir, ið eru skrivaðar beinleiðis inn í

sterkstreymsreglugerðina við iskoyti av ávísum donskum og harvið eisini føroyskum serkrøvum.

Í førum, har tað ikki eru evropiskir ella altjóða standardir, t.d. viðvíkjandi innleggingum í bústøðum, eru nágreiniligar reglur ásettar í stekstreymsreglugerðini.

Í nøkrum førum eru reglurnar í sterkstreymsreglugerðini ikki dagførdar við nýggjastu og galdandi útgávunum av evropisku ella altjóða standardunum.

Sterkstreymsreglugerðin inniheldur eisini ein fyrisitingarligan part við allýsingum, almennum reglum um trygdarkrøv, ábyrgd og skyldum hjá eigara og brúkara av elektriskum veitingarútbúnaði og elektriskum innleggingum, eftirlit og revisiásetingar.

Fyrisitingarligu reglurnar, sum vóru í sterkstreymsreglugerðini "Administrative bestemmelser", eru nú í "bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration af stærkstrømsloven. Hesin parturin er týðandi, fyri at umsita lóggávuna og halda henni uppi.

Í Danmark kom nýggj lóg viðvíkjandi eltrygd (elsikkerhedsloven) í gildi 1. januar 2016. Sterkstreymsreglugerðin er í kunngerðunum sbrt lógini sett úr gildi í Danmark, tó við skiftisskipanum. Fyri elektriskar innleggingar eru reglurnar í sterkstreymsreglugerðini í gildi til og við 30. juni 2019.

Eftir § 2, stk. 4 í sterkstreymslógini er tað tann til hvørja tíð (dagførda) danska sterkstreymsreglugerðin, sum er í gildi í Føroyum. Reglurnar í sterkstreymsreglugerðini, sum í Danmark eru ella verða settar úr gildi, er tí heldur ikki í gildi í Føroyum.

Fyribils er sterkstreymsreglugerðin, undir hesum reglurnar í bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven, sum var sett í gildi í Danmark 1. januar 2016 er-galdandi, til nýggjar reglur verða ásettar, sbr. kunngerð nr. .. um sterkstreymsreglugerð o.a.

Reglurnar í sterkstreymsreglugerðini, undir hesum reglurnar í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration af stærkstrømsloven", eru avgerandi fyri, at lóggávan kann virka eftir ætlanini at skapa høgt trygdarstøði soleiðis, at elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar ikki skal vera til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

Tað hevur tí stóran týdning, at nýggjar reglur skjótast gjørligt verða settar í gildi í staðin fyri sterkstreymsreglugerðina, undir hesum bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration af stærkstrømsloven fyri at lóggávan á økinum kann virka eftir ætlan, og fyri at vinnan ikki skal vera í óvissu um, hvørjar reglur galda og fara at galda framefti.

Nýggju reglurnar eiga framvegis at byggja á evropiskar og altjóða standardir fyri at halda eitt høgt eltrygdarstøði.

At skriva teir umfatandi evropisku og altjóða standardirnir inn í føroyskan rætt við at skriva teir inn kunngerð sbrt. lógini er í praksis ikki gjørligt, og er heldur ikki skilagott.

Í grannalondunum eins og í Danmark verða hesir standardir ikki skrivaðir inn í lóg ella kunngerð sbrt lóg sum bindandi rættarreglur, men verður vist til teir sum standardir ella normar

LM-087/2020

fyri, hvussu almenna trydarkravið um, at elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar ikki skal vera til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn kann verða lokið.

Í galdandi lóg er ikki heimild fyri at nýta standardirnar við tilvísing til teir í kunngerðunum sbrt. lógini, og neyðugt er tí at útvega tílíka lógarheimild, fyri at kunna nýta standardirnar, uttan at teir verða skrivaðir inn í kunngerðirnar sum bindandi reglur, men við tilvísing til teir sum frávikiligir standardir (normar) fyri, hvussu almenna trygdarkarvið kann verða lokið.

Fyrisitingaligi parturin, "Stærkstrømsreglementet, afsnit 1 Administrative bestemmelser", varð, sum nevnt, eisini settur í gildi í Føroyum við kunngerð nr. 173 frá 21. september 1993 um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð v.m.

Í sterkstreymslógini og í kunngerðunum sbrt. lógini verður víst til fyrisitingarligu reglurnar, sum vóru í "Stærkstrømsreglementet, afsnit 1 Administrative bestemmelser". Við seinni broytingum í donsku lóggávuni eru gjørdar broytingar í myndugleikum og reglum, sum vóru í sterkstreymsreglugerðini "afsnit 1 Administrative bestemmelser". Fyrisitingarligu reglurnar eru nú, sum nevnt, í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven" við seinni broytingum.

Sterkstreymslógin og kunngerðirnar sbrt. lógini eru ikki dagførdar samsvarandi. Mett verður tó, at reglurnar í bekendtgørelse om administration m.v. eru í gildi við teimum avmarkingum, sum føroysk lóggáva setur. Í praktisku umsitingini av lóggávuni kann hetta tó skapa iva, eisini tí at bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven inniheldur reglur av inntrívandi slagi m.a. um boð og forboð og krav um rindan av útreiðslum í sambandi við boð og forboð.

Tað er tí tovur á, at fyrisitingarligu reglurnar, sum í dag eru í bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven, ganga greiðari fram av lóggávuni.

1.2.3. Fyrisiting
Elnevndin er sett sbrt. § 6 í sterkstreymslógini.

Elnevndin er eftir lógini fyrisitingarligur myndugleiki undir landsstýrismanninum viðvíkjandi eltrygd.

Nevndin skal m.a. hava eftirlit við elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektiskum tilfari, fremja upplýsingarvirkemi um eltrygd og upplýsa um vandamikið elektriskt tilfar o.a.

Nevndin er kærumyndugleiki viðvíkjandi avgerðum, sum SEV hevur tikið um løggildingar eftir løggildingarlógini og í málum viðvíkjandi elektriskum innleggingum, sum eru løgd til SEV sbrt. sterkstreymslógini.

Nevndin kann áseta reglur, sum víkja frá sterkstreymsreglugerðini og gera frávik í ítøkligum førum. Elnevndin skal harumframt vera landsstýrismanninum til hjálpar í neyðugan mun við ráðum o.s.fr. í spurningum, sum koma undir lógina.

Elnevndin er samansett av formanni, ið skal vera lógfrøðingur, rakstrarleiðaranum fyri SEV, stjóranum fyri Landsverk, einum góðkendum elinnleggjara, sum Føroya elinnleggjarfelag

tilnevnir, og einum limi við elfrøðiligari útbúgving. Landsstýrið tilnevnir formannin og seinast nevnda lim.

Útreiðslurnar av virkseminum hjá elnevndini verða goldnar úr landskassanum.
Í løgildingarlógini er ásett, at fyri at fáa og varðveita løggildingina verður goldið eitt árligt gjald, sum landsstýrið ásetir eftir tilmæli frá Elnevndini. Gjaldið 1.000 kr./ár, sum verður nýtt til figging av virkseminum hjá SEV hevur eftir heimiling sbrt. § 21 í sterkstreymslógini eftirlit við øllum nýggjum innleggingum. Útreiðslurnar av eftirlitinunum krevur SEV frá brúkarunum av elektrisiteti yvir elprísirnar.

Kommenterede [HD24]: Í verandi skipan sær búskapurin soleiðis út:
Landskassin fær árliga 139.000 kr, svarandi til, at allir 139 eindeggjaramir fáa eina árliga rokning á 1.000 kr. fyri løggilding (hesin peningur verður ikki goldin viðari til SEV). SEV ger alt arbeiði á virkisokinum (tó ikki at skriva út rokningar og at krevja peningin inn), hetta er fyri SEV mett til ein árligan kostnað á 150.000 kr.
Uttan at tað er greitt hvussu hetta virkisokið verður skipað framefti, ber ikki til at gera viðmerkingar til hvør kostnaðurin av virkisokinum verður.

Elnevndin er fyrisitingarligur myndugleiki og skal sum slík fylgja ásetingunum í innlitslógini, fyrisitingarlógini og fyrisitingalóggávuni annars, undir hesum skyldum at skráseta øll mál, sum eru til viðgerðar í nevndini og geva innlit í slík mál.

Ein nevnd er illa skikkað sjálv at útinna praktiska eftirlitið við elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektiskum tilfari og praktisku uppgávurnar viðvíkjandi upplýsingarvirksemi um eltrygd og upplýsingar um vandamikið elektriskt tilfar o.a., umframt uppgávurnar, sum fylgja av innlitslóg, fyrisitingarlóg og fyritingarlóggávuni annars, undir hesi skylduni at skráseta øll mál, sum eru til viðgerðar í nevndini og geva innlit í slík mál.

Kommenterede [HD25]: Tað er gott at ljós verður varpað á ta umsiting, sum SEV tekur sær av vegna landið og ikki verri um kostnaðurin, sum SEV skal rinda til umsisting av økinum verður nágreinaður á elrokningini. Sí annars yvirskipaðu viðmerking 1).

Tað er tí tørvur á, at tað verða gjørdar broytingar viðvíkjandi umsitingini av lóggávuni, fyri at fáa umsitingina av økinum í eina meira skipaða og trygga legu.

1.2.4. Fígging

Útreiðslurnar av eftirlitinunum, sum SEV krevur frá brúkarunum av elektrisiteti yvir elprísirnar er ikki nóg gjøgnumskygd, tí hetta framgongur ikki av lóggávuni og av løgtingsfíggjarlógini.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Høga støðið í føroysku lóggávuni viðvíkjandi eltrygd er grundað á, at ítøkiligu og nágreiniligu teknisku reglurnar um gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum og um gerð og nýtslu av eltilfari, hava støði í evropiskum og altjóða viðurkendum standardum.

Endamálið við uppskotinum er, at reglurnar bæði í sjálvari lógini og í nýggju kunngerðunum verða einfaldari og nútímansgjørdar, fyri at tryggja eina lóggávu við rúmd fyri tøkniligu menningini, samstundis sum tað verður tryggjað, at elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar hava eitt trygdarstøði, sum ikki er til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

Lógaruppskotið kemur í staðin fyri verandi sterkstreymslóg og inniheldur nútímansgerð av teknisku reglunum, sum í dag eru í sterkstreymsreglugerðini, fyri í størri mun at nýta evropiskar og altjóða standardir.

Ætlanin er við lógaruppskotinum at geva innleggingarfyritøkum størri frælsi við annaðhvørt at gera arbeiðið við t.d. eini elektriskari innlegging eftir einum galdandi evropiskum ella altjóða standardi, ella at gera tað á ein hátt, sum lýkur lógarinnar krav til trygd.

Endamálið er eisini at dagføra lóggávuna fyri at gera bygnaðin av regluverkinum viðvíkjandi fyrisitingini av lóggávuni einfaldari og at gera reglurnar greiðari við at seta fyrisitingarligar reglur í gildi í staðin fyri galdandi, sum eru fyribils í gildi, til tær verða avloystar av nýggjum reglum.

Harumframt er endamálið við uppskotinum at fáa umsitingina av lógini í eina meira skipaða og trygga legu, soleiðis at dagliga umstingin hjá Elnevndini kann verða løgd til ein verandi almennan stovn, t.d. arbeiðseftirlitið umframt at fleiri uppgávur hjá nevndini kunnu verða lagdar til netfelagið ella til privatar fyritøkur. Útreiðslurnar av umstingini og eftirlitinunum við lógini, sum SEV krevur frá brúkarunum av elektrisisteti yvir elprísirnar skal gerast meira gjøgnumskygdar við tað, at útreiðslurnar tað skal framganga av sterkstreymslógini og av løgtingsfiggjarlógini.

Kommenterede [HD26]: Víst verður til viðmerkingina omanfyri

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

1.4.1. Alment

Lógaruppskotið inniheldur reglur um gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari og eftirlit við hesum.

Heitið á lógini er í dag løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað (sterkstreymslógin). Skotið verður upp, at heitið verður broytt til løgtingslóg um elelektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar (Eltrygdarlógin)

Hugtøkini elektriskur útbúnaður, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar eru meira tíðarhóskandi, eins og endamálið um trygd verður undirstrikað.

Eftir uppskotinum verða yvirskipaðu almennu reglurnar um eltrygd ásettar í lógini og útgeinaðar í kunngerðunum.

Heimilað verður ladsstýrismanninum at áseta nýggjar reglur um tekniska trygd í eini rød av kunngerðum um trygdarkrøv fyri elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar, sum skulu avloysa galdandi sterkstreymsreglugerð. Teknisku reglurnar skulu í størri mun byggja á evropiskar og altjóða standardir, t.e. standardir, sum tann evropiski standardiseringsstovnurin CENELEC (European Committee for Electrotechnical Standardization) hevur gjørt ella til altjóða standardir, sum altjóða standardiseringsstovnurin IEC (International Electrotechnical Commission) hevur gjørt.

Fyrisitingarligu heimildirnar, at taka avgerðir eftir lógini og eftir kunngerðunum sbrt. lógini, verða, eins og eftir galdandi lóg, lagdar til Elnevndina undir hesum eftirlit við elektriskum útbúnaði, elsktriskum innleggingum og elektriskum tilfari.

Eftir uppskotinum skal Elnevndin mótvegis landsstýrismanninum hava yvirskipaðu ábyrgdina av arbeiðinum við eltrygd undir hesum eftirlit við elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari. Elnevndin skal kortini ikki sjálv útinna eftirlitið, sum Elnevndin kann leggja til almennan myndugleika, netfelagið ella til privata fyritøku við góðkenning frá landsstýrismanninum.

Útreiðslurnar hjá landinum av umsitingini av lógini verða rindaðar av SEV, og sum SEV kann krevja, at brúkararnir hjá SEV rinda yvir elprísirnir. Skyldan hjá SEV at rinda verður ásett í lógini og gjaldið, sum kann verða kravd frá SEV, verður fyri hvørt figgjarár ásett á løgtingsfiggjarlógini. Upphæddin skal samsvara við útreiðslurnar, sum verða játtaðar á løgtingsfiggjarlógini til umsitingina av lóggávuni.

Kommenterede [HD27]: Víst verður til viðmerkingina omanfyri.

1.4.2. Einfaldari reglubygnaður og greiðari reglur.
Eftir lógaruppskotinum verða stórir partar av reglunum í bekendtgørelse om administration af stærkstrømsloven tiknar upp í nýggju lógina. Við hesum verður verandi reglubygnaður einfaldari við tað, at almennu reglurnar um eltrygd verða savnaðar í lógini.

Sum nevnt undir pkt. 1.2.2.frammanfyri inniheldur bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven reglur av inntrivandi slagi m.a. um boð og forboð og krav um rindan av útreiðslum í sambandi við boð og forboð. Orsakað av, at lóggávan ikki er dagførd, kann ivi verða um, í hvønn mun reglurnar í hesi kunngerð kunnu verða nýttar.

Fyri at gera reglurnar greiðari soleiðis, at eingin ivi skal vera, verða reglurnar eftir uppskotinum tiknar upp í lógina. Tað snýr seg um fylgjandi ásetingar í uppskotinum:

Eftir § 15 kann Elnevndin geva boð um, at eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging letur løggildaða elinnleggjarafyritøku fremja eftirlit av útbúnaðinum ella av innleggingini fyri rokning eigarans ella brúkarans.

Eftir § § 16 kann Elnevndin geva eigaranum ella brúkaranum av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging boð um at bøta um feilir og manglar við útbúnaðinum ella innleggingini fyri rokning eigarans ella brúkarans.

Eftir § 17 kann Elnevndin geva netfelagnum boð um at slíta elveitingina, um forboð at nýta innleggingina verður brotið. Elnevndin kann krevja, at kostnaðir av at slíta elveitingina verða endurrindaðir av tí, ið er álagdur forboð.

Eftir § 18 kann í sambandi við marknaðareftirlit við elektriskum tilfari verða kravt, at kostnaðir av uttanhýsis tekniskum kanningum av, um tilfarið lýkur trygdarreglurnar, verða endurrindaðir av tí fyritøkuni har tilfarið er tikið út til kanningar.

1.4.3. Heimild at áseta nýggjar reglur um eltrygd
Lógaruppskotið inniheldur, eins og galdandi sterkstreymslóg, heimild til landsstýrismannin at áseta reglur um eltrygd í sambandi við gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari.

Í dag verða í sterkstreymsreglugerðini sett nágreinilig trygdarteknisk krøv fyri elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar. Nýggju kunngerðirnar sbrt. lógini fara at leggja eitt alment støði fyri trygd og fara harumframt at vísa til evropiskar og altjóða standardir. Á økjum, har tað ikki eru evropiskir ella altjóða standardir, t.d. elektriskar innleggingar í bústøðum ella á økjum, har tað er avgerandi fyri teknisku trygdina, verða gjørd ískoyti til standardirnar við nágreiniligum ásetingum.

Munurin millum reglurnar í dag og uppskotið er, at tað ikki verða ásett nágreinilig krøv á økjum, har standardar eru, ið tryggja neyðuga trygdarstøðið.

Við at vísa til standardirnar í kunngerðunum, í staðin fyri - sum í dag – í umvegis stekstreymsreglugerðina at flyta standardirnar beinleiðis inn í føroyskan rætt, slepst undan at broyta kunngerðirnar, um standardirnir verða broyttir. Tað hevur við sær, at føroysku reglurnar í størri mun kunnu fylgja við tøkniligu menningini. Fyritøkurnar verða ikki bundnar at fylgja standardunum. Tær kunnu velja annaðhvørt at fylgja standardunum ella á annan hátt halda almennu trygdarkrøvini.

Kommenterede [HD28]: Hóast tað ikki er greitt hvussu viðurskiftini skulu skipast, bendir nógv á, at talan verður um økt eftirlitsarbeiði, sum eisini skal gjaldast fyri.

Prinsippielli munurin millum verandi skipan viðvíkjandi tekniskari trygd og skipanina eftir uppskotinum er samanumtikið, at stórur partur av reglunum flytir seg frá at vera lógarbundin krøv til at vera vegleiðandi normar.

Roknast kann helst við, at elinnleggjarar í stóran mun fara at nýta standardirnar, í staðin fyri at velja eina alternativa loysn, sum setur størri og dýrkandi krøv til skjalprógvan, sbr. niðanfyri.

Formliga verður hátturin at regulera broyttur, men talan er ikki um realitetsbroytingar viðvíkjandi krøvunum til eltrygd, og sosatt verður ikki slakað við trygdarkrøvunum.
Viðkaðu møguleikarnir at velja tekniska loysn viðvíkjandi gerð av elektriskum útbúnaði, elektriskari innlegging og elektriskum tilfari, ger tað neyðugt at seta ávís krøv um skjalprógvanir. Slík skjalprógvan er neyðug t.d. fyri møguleikarnar hjá Elnevndini at hava eftirlit við og tryggja, at reglurnar verða hildnar. Á innleggingarøkinum kann tað t.d. eisini hava týdning fyri, at innleggjarafyritøkur kunnu víðka ella umvæla innleggingar seinni.

Elinnleggingarfyritøkurnar skulu í sambandi við innleggingarbeiði fráboða Elnevndini ella heimilaðum eftir § 23, hvussu kravið um tekniska trygd er lokið.

Um ein innlegging er gjørd sbrt. galdandi standardi, verður kravið til skjalprógvan í mun til valið av tekniskari loysn uppfylt við at upplýsa fyri Elnevndini, hvør standardur verður nýttur til arbeiðið. Er ein standardur ikki ella bert partvíst nýttur, verður kravið til skjalprógvan strangari.

Ætlanin er við heimild í § 7, stk. 3 í uppskotinum í kunngerðunum at áseta eina fráboðanarskipan viðvíkjandi skjalprógvan til Elnevndin ella einum almmenum stovni, netfelagnum ella privatari fyritøku, sum verður heimilað eftir § 23 í uppskotinum.

Kommenterede [HD29]: Eru hesi uppskot gjørd ? Tey eiga at verða gjørd í sambandi við at lógaruppskotið skal viðgerast, soleiðis at tað sæst hvussu skipanin ætlandi skal verða.

Eftir uppksotinum til nýggja løggildingarlóg, sum er lagt fram samstundis við hesum uppskotinum er krav um, at elinnleggingarfyritøkur skulu hava góðskuleiðsluskipanir, og at tær har skulu skráseta upplýsingar um endaroyndarkoyringar á elinnleggingum. Sostatt fara tað við nýggju lóggávuni um løggilding av elinnleggjarum at verða gjørdar skjalprógvanir, sum eru knýttar at einstøku innleggingini. Mett verður tí, at tær kravdu upplýsingarnar partvíst fara at verða fevndar av skylduni hjá elinnleggingarfyritøkum at goyma upplýsingar í góðskuleiðsluskipanini.

Endamálið við at byggja teknisku reglurnar á evropiskar og altjóða standardir er at skapa størri fleksibilitet fyri fyritøkurnar. Harafturat kann hetta viðvirka til, at føroyskar fyritøkur fáa betri atgongd til at arbeiða í øðrum londum, har regluverkið eisini byggir á slíkar standardir, samstundis sum at hetta stuðlar undir kappingina á eløkinum í Føroyum.

Sum heild verður marknaðurin latin upp, og møguleikarnir fyri kapping økist bæði fyri útlendskar fyritøkur í Føroyum og føroyskar fyritøkur í útlandinum.

1.4.4. Fyrisiting

Eftir uppskotinum skal Elnevndin mótvegis landsstýrimanninum hava ábyrgdina av arbeiðinum við eltrygd.

Skotið verður upp, at Elnevdin við góðkenning frá landsstýrismanninum kann leggja avgreiðsluskrivstovuna hjá Elnevndini til ein av verandi stovnum hjá landinum, t.d. Arbeiðseftirlitið ella til netfelagið at taka sær av dagligu og praktisku uppgávunum hjá nevndini. mar viðvíkjandi arbeiðinum við eltrygd undir hesum praktiska eftirliti við elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari til mnetfelagið ella privata fyritøku. Elnevndin skal hava praktiska eftirlitið, tá tað snýr seg um eftirlitið við elektriskum útbúnaði, elektriskum innleggingum hjá netfelagnum. Elnevndin kann fáa sær uttanhýsis hjálp at útinna eftirlitið.

Kommenterede [HD30]: Slávilla

Kommenterede [HD31]: Mælt verður til at tað í sambandi við viðgerðina av lógaruppskotinum er funnið út av hvussu skipanin skal virka, hvør skal gera hvat og at uppskot til kunngerðir fyriliggja.

Elnevndin skal innanfyri teir karmar, sum verða ásettir av landsstýrismanninum og á árligu løgtingsfiggjarlógunum, standa fyri yvirskipaðu umsitingini og stýringini av eftirlitsarbeiðinum og í tí sambandinum standa fyri upplýsing um eltrygd.

Ein týðandi uppgáva hjá nevndini verður sostatt innanfyri givnar karmar at raðfesta millum ymsu eftirlitsuppgávurnar.

Nevndin skal eisini gera uppkast til kunngerðir á økinum, geva fráviksloyvi frá trygdarteknisku reglunum í standardunum, ella í ítøkiligum førum seta strangari krøv enn ásett.

Elnevndin skal eftir uppskotinum verða kærumyndugleiki viðvíkjandi avgerðum, sum feru tiknar viðvíkjandi elektriskum innleggingum av almennan myndugleika, netfelagið ella privatum felagið, sum hevur fingi heimildir eftir § 23 í uppskotinum.

Nevndin skal, sum higartil, luttaka í norðurlendska samstarvinum um eltrygd í NSS (Nordisk komité for samordning af elektriske sikkerhedsspørgsmål).

Við hesum kann fyrisitingin hava neyðugt innlit í økið eltryd og menningina á økinum við tað, at serlig sakkøn eru við í umstingini av lógini og í gerð av reglum í lóg og kunngerðum. Samstundis verður givið áhugapørtum, netfelagnum og elinnleggjarum ávirkan á, at tað framhaldandi kann haldast eitt høgt eltrygdarstøði.

Skotið er upp, at tað verður skipað ein avgreiðsluskrivstova undir Elnevndini eftir nærri avgerð nevndarinnar og góðkenning landsstýrimansins.

1.4.6. Figging

Skotið verður upp, at tað verður ásett í lógini, at í tann mun, tær ikki verða rindaðar av gjøldum o.a., skal SEV rinda útreiðslurnar, sum landið hevur av eftirlitinum við lógini undir hesum virksemi hjá Elnevndini eftir lógini.

SEV kann sum higartil krevja útreiðslurnar rindaðar av brúkarum av elektrisiteti frá SEV yvir elprísirnir.

Støddin á upphæddini, sum verður kravd frá SEV, verður játtað á løgtingsfiggjarlógini.
Við hesum fæst størri gjøgnuskygni í kostnaðin av umsitingini og eftirlitinum, sum nú fer at framganga av lóggávuni og av løgtingsfiggjarlógini.

Kommenterede [HD32]: Um tað skal vera møguligt at fyrihalda seg kostnaðin av nýggju lógini, er neyðugt at vita hvussu ætlanin er at skipa virksemi.

1.4.7. Ígildiskoma og skiftisreglur

Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2021. Eftir uppskotinum verða reglur, sum eru settar í gildi sbrt. sterkstreymslógini á verandi í gildi, til hesar verða settar úr gildi ella verða avloystar av reglum sbrt. hesi lóg.

Ætlanin er, at fyri gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum, skal ein partur av galdandi sterkstreymsreglugerð í eini skiftistíð kunna verða nýttur, sbr. kunngerð nr. 117 frá 19. juli 2019 um sterkstreymsreglugerð o.a.

Eftir uppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta skiftisreglur.

Mett verður, at tørvur er á skiftisreglum í sambandi við skifti til nýggju lóggávuna, soleiðis at vinnan fær møguleika at tillaga seg til nýggju reglurnar og møguleikar á eløkinum.
Tørvur á skiftisreglum kann ikki metast í løtuni, men verður mett um og støða tikin til tað í sambandi við gerð av teimum kunngerðunum, sum skulu koma í staðin fyri verandi sterkstreymsreglugerð.

Kommenterede [HD33]: Neyðugt er at hava orðað uppskot til kunngerðir og skiftisreglur fyri at kunna viðgera lógaruppskotið á einum upplýstum og forsvarligum grundarlagi, eins og gjørt var, tá ið øki var dagført í 1993.

Roknað verður við, at kunngerðirnar kunnu verða sendar til ummælis og settar í gildi seinni í ár.

Kommenterede [HD34]: Hví ikki fáa hetta gjørt beinanvegin, soleiðis at lógaruppskotið verður viðgjørt tá uppskot til kunngerðir fyriliggja og greitt er hvussu øki ætlandi skal skipast og hvør mettur kostnaður stendst av hesum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið varð sent til ummælis seinasta vár, men verður kortini sent ummælis av nýggjum, hóast talan bert er um smávegis tekniskar broytingar í mun til tað uppskotið.

Niðanfyri eru viðmerkingarnar í innkomu ummælunum og viðmerkingarnar til ummælini endurgivnar.

Uppskotið varð seinasta vár sent til ummælis hjá: Føroya Handverksmeistarafelagi, SEV, Føroya Landfúta, Pf Einar Mikkelsen, Sjóvinnustýrinum. Búnaðarstovuni, Umhvørvisstovuni, Arbeiðseftirlitinum, Landsverki, Vinnuhúsinum og Sorinskrivaranum.

Tað komu ummælissvar frá:
Føroya Handverksmeistarafelagi, SEV, Føroya Landfúta, Pf Einar Mikkelsen, Sjóvinnustýrinum og Búnaðarstovuni. Hoyringssvarini eru løgd við uppskotinum (skjøl 1-6).

Viðmerkingar til ummælið frá Føroya Handverksmeistarafelag
Í mun til uppskotið, sum varð sent til ummælis, er uppskotið broytt soleiðis, at Elnevndin kann heimila øðrum myndugleikum, netfeløgum ella privatum fyritøkum at fremja eftirlitsuppgávur, sbr. § 23 í uppskotinum. Hendan broytingin er í samsvari við viðmerkingarnar í ummælissvarinum frá Føroya Handverksmeistarafelag.

Viðmerkingar til ummælið frá SEV
Sum SEV vísir á í ummælinum, so er talan um eina rammulóg. Av lógaruppskotinum sæst, hvussu yvirskipaðu karmarnir fyri eltrygarøkið skal vera, og hvat skal fara fram á økinum.
Hvussu umsitingin av lógini í praksis nærri skal verða skipað, undir hesum m.a. hvørjar uppgávur skulu leggjast til annan mynduleika, SEV ella privata fyritøku; hvussu uppgávurnar innanfyri ásettan figgjarkarm skulu raðfestast, og á hvønn hátt tær skilabest verða framdar í verki, er ein fyrisitingarligur spurningur, sum landsstýrismaðurin og Elnevndin taka avgerð um og í samráð við SEV, um eftirlitssuppgávur verða lagdar til SEV. Fortreytin fyri støðutakan til hetta er, at tað er greitt hvørjir karmarnir eru, sum skipanin skal halda seg innanfyri. Við lógaruppskotinum verða skaptir slíkir greiðir lógarkarmar.

Kommenterede [HD35]: Gingið verður út frá, at hetta verður dagført í mun til hesar seinast givnu viðmerkingarnar frá SEV, og tí verða viðmerkingar ikki gjørdar til hetta brotið.

Tikið verður sostatt ikki undir við sjónarmiðinum hjá SEV, at tað, orsakað av at kunngerðirnar enn ikki eru gjørdar, ikki er nóg gott grundarlag fyri at viðgera uppskotið.

Sum nevnt kom nýggj lóg viðvíkjandi eltrygd (elsikkerhedsloven) í gildi í Danmark 1. januar 2016. Sterkstreymsreglugerðin er í kunngerðunum sbrt. elsikkerhedsloven sett úr gildi í Danmark, tó við skiftisskipanum. Fyri elektriskar innleggingar eru reglurnar í sterkstreymsreglugerðini í gildi til og við 30. juni 2019. Sterkstreymsreglugerðin verður sostatt í sama mun eisini sett úr gildi í Føroyum. Hóast Elnevndin sum nevnt hevur fráboðað, at stekstreymsreglugerðin fyribils er í gildi, er tað formliga rættari, at hetta verður ásett í lóg, sbr. § 42, stk. 1 í uppskotinum. Tørvur er tí á, at lógin verður sett í gildi skjótast gjørligt, fyri at tað ikki skal verða óvissa um, hvørjar reglur galda og fara at galda frameftir.

Viðvíkjandi upplýsingunum hjá SEV um kostnaðir skal viðmerkjast, at eftir tí tilfari, sum Elnevndin hevur, varð í 2011 mett, at kostnaðir av umsiting av lógini vórðu uml 4,5 mió. kr.

Viðmerkingar til ummæli frá Føroya Landfúta
Landfútin hevur í ummælisskrivi vist á, at Føroyska rættargangslógin framvegis í § 721 ger skilnað millum politimál og statsadvokatmál. Landfútin metir tí, at tað eigur at verða umhugsað, um tað í sambandi við revsimál fyri brot á lógina er tørvur á, at tað í revisásetingini í 38 verður sett, at tey í rættargangslógini nevndu tiltøk í kap. 69 um handtøku, kap. 70 um fongsling, kap. 72 um rannsókn og kap. 73 um inndrátt, kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum. Mett verður, at tørvur er á slíkum heimildum, og er hetta sostatt ásett í § 38, stk. 3. Líknandi áseting er í § 7, stk. 5 í vápnalógini.

Viðmerkingar til ummælið frá Búnaðarstovuni
Búnaðarstovan metir ikki at ásetingarnar í uppskotinum um ognartøku veita verandi lendiseigarum nøktandi endurgjald, serliga í sambandi við lendi til vindorkuframleiðslu. Spurt verður um, hvørt ognartøkumyndugleikin kann ognartaka lendi til ein privatan vinnurekandi at virka á.

Eftir § 33 í uppskotinum kann landsstýrismaðurin, tá ið almannagagnið krevur tað, aftan á at hava fingið ummæli frá Elnevndini, loyva, at sett verður í verk ognartøka viðvíkjandi fastogn eftir reglunum í "lov nr. 69 af 7. maj 1881 om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder, samt til offentlige veje, havne og landingssteder, samt til offentlige skoler på Færøerne" til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi.

Eftir ognartøkulógini frá 1881 verður støddin á endurgjaldinum ásett eftir óheftum metingarfólki, sum rætturin tilnevnir, og skulu teir "ansætte vedkommende Ejendom til sand Værdi i Handel og Vandel."

Endurgjaldið verður sostatt ásett eftir vanligum reglum um endurgjald í sambandi við ognartøkur, og veitir fult endurgjald fyri ongartikna lendið.

Tá almnnagagnið krevur tað, kann eisini verða ognartikið til privatar vinnurekandi. Hetta er ein spurningur um, hvussu neyðug ognartøkan er fyri at fremja eina verkætlan, sum elveitingarmynduleikin ynkir at fremja.

Mett verður, at tað í hesi lógini ikki er rætt at áseta serliga reglur, sum víkja frá vanligu reglunum um ognartøkur.

LM-087/2020

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Figgjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kommenterede [HD36]: Um tað skal vera møguligt at fyrihalda seg kostnaðin av nýggju lógini, er neyðugt at vita hvussu ætlanin er at skipa virksemi.

Eftir uppskotinum skal SEV rinda landinum fyri útreiðslurnar, sum landið hevur av eftirlitinum við lógini. Upphæddin, sum kravd verður frá SEV kann, sum higartil, leggja gjaldið til landskassan oman á elprísirnir.

Upphæddin, sum verður kravd frá SEV, skal fyri hvørt figgjarár ásetast í løgtingsfiggjarlógini, sum skal samsvara við útreiðslurnar á løgtingsfiggjarlógini, og sum verða mettar neyðugar at rinda fyri umsitingina av lóggávuni.

Útreiðslurnar av eftirlitinum við nýggjum innleggingum, sum SEV hevur í dag, eru í figgjarætlanini hjá SEV fyri 2019 3,2 mió. kr.

Játtanin til Elnevndina er í dag 350.000 kr. Útreiðslurnar av virkseminum hjá Elnevndini verða eftir uppskotinum eisini kravdar frá SEV.

Endalig meting av inntøkum og útreiðslum er enn ikki gjørd. Tað valdast m.a., hvussu eftirlitið nærri verður skipað undir hesum, hvørt tørvur er á, sum í dag, at hava fysiskt eftirlit á staðnum við øllum nýggjum innleggingum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fleiri eftirlitsuppgávur kunnu verða lagdar til annan almennan myndugleika, netfelagið ella privata fyritøku.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Kommenterede [HD37]: Við tað, at farið verður yvir til at nýta standardir, verður ein stórri arbeiðsbyrða løgd á privatu vinnuna. Hetta er m.a. keyp av standardum og nakað meira av projektering.

Við ígildissetan av nýggjum kunngerðum um trygdarteknisk krøv fyri elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar, sum skulu koma í staðin fyri galdandi strekstreymsreglugerð, verða reglurnar einfaldari soleiðis, at tær í størri mun fara at byggja á evropiskar standardir. Tað kann hava við sær størri effektivitet á føroyska marknaðinu, og nýggjar reglur, summbyggja á evropiskar standardir, og sum sum líkjast teimum í grannalondunum geva føroyskum fyritøkum størri møguleika at kappast á útlendska marknaðinum, samstundis sum føroyski marknaðurin verður meira opin fyri kapping frá útlandinum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvi

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær marknaðarforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Í § 38 í uppskotinum eru ásetingar um bøtur sum revising fyri tilætlað brot á nærri tilskilaðar reglur í lógini og á reglur settar sbrt. lógini.

2.11. Skattir og avgjald
Eftir § 36 í uppskotinum skal fyritøkan, sum hevur netloyvi eftir løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, rinda eitt árligt gjald til figging av útreiðslunum til umsitingina av eltrygdarlógini í tann mun, tær ikki verða rindaðar av gjøldum o.a

Gjaldið, sum verður kravt frá netfelagnum, verður játtað á løgtingsfiggjarlógini.
Netfelagið, í praksis SEV, kann sum higartil krevja gjaldið frá einstaka brúkaranum yvir elprísirnir.

2.12. Gjald
Eftir §15, § 16, § 17, stk. 3, § 20, stk. 4, kann Elnevnin sjálv seta tiltøk í verk, um boð ella forboð ikki verða fylgd og krevja, at tann, ið er fevndur av boðnum ella forboðnum, rindar fyri útreiðslurnar av tiltakinum.

Eftir § 18 í uppskotinum kann Elnevnin, uttan at rinda fyri tað, taka elektriskt tilfar út til nýtslu í eftirlitinum eftir § 13, stk. 1. 2. Elnevndin kann lata gera tekniska kanning av elektriskum tilfari, sum er tikið út, og krevja, at kostnaðir av uttanhýsis kanningum verða endurrindaðir av tí, sum í sambandi við kanningina fær fráboðað álegging ella forboð eftir §§ 20 og 21, stk. 1-2.

Eftir § 20, stk. 1 kann Elnevndin seta forboð fyri sølu, útflýggjan, innlegging ella brúki av elektriskum tilfari, ið ikki heldur reglur, ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3 ella trygdarkravið í § 4.
Eftir stk. 2 kann Elnevndin geva boð um, at elektriskt tilfar, sum er fevnt av forboði eftir stk. 1, verður tikið aftur frá marknaðinum verður afturkallað frá brúkarum ella verður fyribeint.
Eftir stk. 3 kann Elnevndin geva boð um, at elektriskt tilfar, sum er fevnt av forboði eftir stk. 1, verður koplað frá.

Verða boð eftir stk. 3 ikki hildin, kann Elnevndin eftir stk. 4 geva eini løggildari innleggjarafyritøku boð um at frákopla elektriska tilfarið, um tað er fast innlagt. Elnevndin kann krevja kostnaðin av frákopling endurrindaðan av tí, sum hevur fingið fráboðan um boð eftir stk. 3.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur eigarum og brúkarum av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum og framleiðarum, innflytarum og handlandi við elektriskum tilfari upplýsingarskyldur mótvegis Elnevnini í sambandi við eftirlit við lóggávuni.

Eftir § 12 í uppskotinum skal tann, ið rekur ein elektriskan útbúnað, rinda endurgjald fyri skaða á persón ella góðs, sum útbúnaðurin er atvold til, uttan so at tað verður prógvað, at sloppið kundi ikki verið undan skaðanum við tí ansni og nærlagni, sum rakstur av slíkum útbúnaði krevur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Eftir § 23 í uppskotinum kann Elnevndin heimila almennum myndugleika, netfelagnum ella privatari fyritøku at:

1) fremja eftirlitsuppgávur eftir § 13, stk. 1,
2) hjálpa Elenvndini at fremja eftirlit eftir § 13, stk. 1,
3) seta forboð eftir §§ 15, 16, 17, stk. 1, 19 og 20, stk. 1-2.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Eftir § 14 í uppskotinum hava Elnevndin, netfelag ella fyritøka, heimilað sbrt. § 23, til eina og hvørja tíð við viðkomandi samleikaprógvi og uttan rættarúrskurð, atgongd til almennar og privatar ognir og støð til tess at útvega upplýsingar, ið skulu brúkast til at fremja eftirlit við hesi lóg. Um neyðugt, veitir løgreglan Elnevndini stuðul til hetta.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella oki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Figgjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstoku greinina

Til § 1

Eftir uppskotinum til § 1 er lógin galdandi fyri elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar, har spenningurin er so mikið høgur ella streymstyrkin so mikið stór, at vandi kann standast av hesum. Lógin umfatar eisini elektriskt tilfar.

Nýtsluøkið lógarinnar verður sett inn í lógina fyri at gera greitt, nær lógin skal nýtast. Lógin skal nýtast fyri allan elektriskan útbúnað og allar elektriskar innleggingar, har spenningurin er so mikið høgur ella streymstyrkin er so mikið stór, at vandi kann standast av hesum. Tað framgongur av allýsingini í § 2, stk. 1-2 í lógaruppskotinum, hvat skilst við elektriskan útbúnað og elektriska innlegging.

Vandi í sambandi við elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar kann íkoma við ólagsstreymi, yvirlasting ella skammlopi. Ólagsstreymur kann t.d. standast av fráleiðingi frá feili við eltilfari og kann hava við sær vanda fyri elektriskum stoyti. Við yvirlasti ella skammlopi verða termisku ávirkanirnar so mikið stórar, at tað kann elva til eldsbruna. Yvirlasing kann t.d. henda, tá ov nógv eltilfar verður sett til, soleiðis at innleggingin verður yvirbelastað.

Lógin verður eisini at nýta upp á elektriskt tilfar. Tað framgongur av allýsingini í § 2, stk. 3, hvat verður skilt við elektrisk tilfar.

Til § 2

Stk. 1.
Í stk. 1 í uppskotinum verður eletriskur útbúnaður allýstur.

Skotið verður upp í stk. 1, at við elektriskan útbúnað í hesi lóg skal skiljast allur útbúnaður til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elektriskari orku. Elektriskur útbúnaður er bæði há- og lágspenningsútbúnaður og er ikki avmarkaður til ávíst spenningsmark.
Tað gongur fram av § 1 í galdandi sterkstreymslóg, at við sterkstreymsútbúnað skilst "virki til framleiðslu, flyting og býti av elmegi við so høgum spenningi ella so stórari streymstyrki, at vandi kann standast av, og allar íbundnar elinnleggingar, nýtslulutir og tílíkt."

Sum nevnt í almennu viðmerkingunum eru tær fyrisitingarligu reglurnar í donsku bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven í gildi í Føroyum við neyðugum tillagingum til føroysk viðurskifti.

Í viðmerkingunum til § 1 í galdandi sterkstreymslóg verður sagt, at tað ber ikki til at áseta eitt ávíst mark millum sterkstreym og veikstreym. Slevja, temperaturur og eginleikar í umhvørvinum at leiða streym kann hava ávirkan á, hvussu vandamikil streymurin er.

Avgerandi er sostatt, at vandi kann standast av.

Eftir lógaruppskotinum kann elektriskur útbúnaður samsvarandi ikki allýsast innanfyri ella oman fyri ávíst spenningsmark.

Við atliti til at lýsa hugtøkini og dagføra málburðin í lógini verður skotið upp, at hugtakið elektriskur útbúnaður verður allýst fyri seg. Hugtakið sterkstreymsútbúnaður verður tí ikki nýtt í lógaruppskotinum, tí hugtakið verður lutvíst avloyst av hugtakinum elektriskur útbúnaður, sum verður allýstur, sum allur útbúnaður til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elektriskari orku.

Elveitingarnetið í Føroyum er skipað við háspenningsneti, sum er transmissiónsnet og býtisnet, sum leiðir elektrisitet til transformatorstøðir.

Alt slag av útbúnaði, ið framleiður el, verða fevnt av lógaruppskotinum. Ein útbúnaður kann sostatt eisini vera íbundin sólkyknuskipan, ein generator, ein vindmylla o.a. Bæði stationerur og mobilur útbúnaðir eru fevndir av lógini. Eitt nú verða mobilar generatorútbúnaðir brúktir á festivaløkjum og á størri byggiplássum. Eisini kemur fyri, at fyribils royndarútbúnaður verður brúktur, har háspenningur verður settur til.

Í samsvari við tøkniligu menningina fevnir elektriskur útbúnaðir eisini um útbúnað til goymslu av elektriskari orku. Bakstøðið fyri hesum er, at í Evropa er rákið yvirhøvur í størri mun at gagnnýta varandi orkukeldur til framleiðslu av elektrisiteti. Øktari gagnnýtslu av vindorku í komandi árum at kunna grunda, at útbúnaðir skulu gerast til goymslu av elektriskari orku.

Stk. 2.
Í stk. 2 í uppskotinum verða elektriskar innleggingar allýstar.

Eftir stk. 2 í uppskotinum skal við elektriska innlegging í hesi lóg skiljast sum øll innleggingin frá elektriska útbúnaðinum fram til og við íbundna elektriska tilfarið og leidningar undantikið frá elektriskum innleggingum á skipum, mobilum frálandaskipanum, í flogførum, umframt elektriskar innleggingar í motorakførum, sum eru roknað til rakstur av motorakfarinum, undantikið løðistikk á slíknum motorakførum.

Fyri at gera allýsingina av hugtøkunum í lógini greiðari og fyri at dagføra málið í lógini, verður hugtakið elektriskar innleggingar eftir uppskotinum allýst fyri seg.

Í § 1 í galdandi sterkstreymslóg verður hugtakið sterkstreymsútbúnaður allýstur sum "virki til framleiðslu, flyting og býti av elmegi við so høgum spenningi ella so stórari streymstyrki, at vandi kann standast av, og allar íbundnar elinnleggingar, nýtslulutir og tílíkt." Í uppskotinum verður hugtakið sterkstreymsútbúnaður ikki nýtt, tí tað verður lutvíst avloyst av hugtakinum elektriskar innleggingar.

Elektriskar innleggingar hjá brúkarunum eru vanliga bundnar upp í elveitingarnetið soleiðis, at ein stikkleidningur frá ognini verður settur til eitt kaðalskáp, sum t.d. stendur við vegjaðaran. Við hesum verður føst íkopling til elektriska útbúnaðin, sum er allýstur í stk. 1. Elektriska innleggingin fevnir um alla innleggingina frá veitingarpunktinum og fram til og við íbundnað elektriska tilfarið. Um elektriska tilfarið er íbundið, verður hetta at rokna sum partur av innleggingini, t.d. verður íbundið ljósrør partur av innleggingini.

Elektriskar innleggingar í øllum privatum og almennum bygningum eru fevnda av av lógini. Hetta er galdandi fyri innleggingar í bæði íbúðarognum og vinnuognum. Elektriskar innleggingar í forframleiddum ognum, í húsbátum og í húsvognum eru eisini fevndir av allýsingini í stk. 2 í uppskotinum. Somuleiðis eru elektriskar innleggingar á tjaldingarstøðum og líknandi umframt fyribils innleggingar so sum á byggiplássum, framsýningum og festivaløkjum fevndir av allýsingini.

Elektriskar innleggingar á frálandaútbúnaði (havstøðum) eru ikki fevndar av allýsingini í stk. 2 við tað, at hesar eru fevndar í løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, og at tað er myndugleikin eftir tí lógini, sum ásetur trygdarreglur, undir hesum reglur um eltrygd.

Eftir § 2, stk. 3 í sterkstreymslógini kann landsstýrisnaðurin áseta, at ávís sløg av sterkstreymsútbúnaðum og ávisir bólkar av eltilfari ikki skulu koma undir tær reglur, sum ásettar eri í sterkstreymskunngerðini.

Í § 2, stk. 1 í kunngerð nr. 173 frá 21. september 1993 um igildissetan av sterkstreymsreglugerð er ásett, at sterkstreymskunngerðin ikki hevur gildi fyri:

1) Lágspenningsútbúnaðir til eftirkannan og royndir á rannsóknarstovum og verksmiðjum, sum bert skula lúka reglurnar í reglugerðini í tann mun, hetta kann verða gjørt, uttan at nýtslan av útbúnaðinum av hesum gerst trupul.
2) Akfør. Sterkstreymskunngerðin hevur ikki gildi fyri egnar elinnleggingar og útgerð.
3) Flogfør. Sterkstreymskunngerðin hevur ikki gildi fyri elinnleggingar og útgerð í nýtslu innanborða.

Hetta heldur óbroytt fram eftir uppskotinum.

Viðvíkjandi elektriskum innleggingum umborð á skipum ásetur Sjóvinnustýrið á summum økjum ásetingar um bygnað, útgerð og rakstur av skipum. Av søguligum orsøkum verða tekniska krøvini á fleiri týðandi økjum so sum skrokkur, maskina og el, tó ásett av sonevndu klassingarfeløgunum. Fleiri altjóða sáttmálar, ES-direktiv og reguleringar frá Sjóvinnustýrinum krevja soleiðis, at skipini á hesum økjum lúka tey krøv, sum klassingarfeløgini áseta. Skipsins egnu elektrisku innleggingar eru sostatt ikki fevndar av allýsingini í stk. 2 í uppskotinum.

Skilt verður ímillum, um talan er um elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar, roknað til rakstur av motorakfari, ella um talan er um elektriskar innleggingar, ið verða gjørdar í sambandi við, at eitt motorakfar verður innrættað til eitt ávíst endamál og elektriskt tilfar, ið verður nýtt í hesum sambandi. Tað kann t.d. vera innrætting av einum bókabussi ella eini flytførari heilsustovu. Slíkar serligar innrættingar av motorakfari eru fevndar av galdandi sterkstreymslóg og er regulerað í galdandi sterkstreymskunngerð. Eftir uppskotinum heldur hetta fram.

Løðistikk á elriknum motorakførum eru fevnd av galdandi lóg. Elbilar eru við tíðini vorðnir støðugt betri umtóktir, og løðistikk til elbilar verða eisini fevn av lógaruppskotinum.

Løðistikk, sum eru í elriknum bilum, skulu bæði lúka krøvini, ið galda fyri sjálvt løðistikkið, sum eitt stykki elektrisk útgerð, og innleggingarásetingarnar.

Stk. 3.
Elektriskt tilfar verður allýst í stk. 3 í uppskotinum.

Við elektriskt tilfar skilst eftir stk. 3 í uppskotinum tilfar av einum og hvørjum slag, sum er partur av ella roknað at verða partur av ella verða íbundið elektriskan útbúnað ella ta elektrisku innleggingina, undantikið elektriskt tilfar, sum er serliga roknað til nýtslu umborð á skipum, flytførum frálandaútbúnaði ella í flogførum umframt elektriskt tilfar í motorakførum, ið eru ætlað til rakstur av motorakfarinum, undantikið løðistikk, ið eru ætlað at verða partur av elriknum motorakførum.

Í § 1, stk. 2 í galdandi sterkstreymslóg er eltilfar lýst sum maskinur, tól og tilfar av øllum sløgum, ið nýtt verða í sterkstreymsútbúnaðum.

Skotið verður upp, at hugtakið elektriskt tilfar kemur í staðin fyri hugtakið eltilfar. Elektriskt tilfar skal eftir uppskotinum fevna um tilfar av einhvørjum slagi, ið er partur av ella ætlað at verða partur av ella verða íbundið elektriskan útbúnað ella elektriska innlegging. Elektriskt tilfar, ið er partur av elektriskari innlegging, skal skiljast sum partur av elektrisku innleggingini, t.d. ein ljósskipan. Í slíkum føri skal elektriska tilfarið bæði halda tær ásetingar, sum eru fyri elektriskt tilfar og innleggingarásetingarnar.

Elektrisk tilfar, ið er ætlað til at verða partur av elektriskari innlegging, skal skiljast sum tilfar, ið enn ikki er vorðið partur av elektriska útbúnaðinum ella elektrisku innleggingini.
Elektriskt tilfar kann t.d. vera ólagsstreymsavbrótarar, sikkringar, kaðalar, avbrótarar ella stikkkontaktir.

Elektriskt tilfar fevnir eisini um maskinur og tól, ið eru ætlað at verða íbundið elektriska útbúnaðin ella elektrisku innleggingina. Við maskinir meinast t.d. ventilasjónsútbúnaður. Við tól meinast t.d. tól, ið verða nýtt í húsarhaldinum, t.d. kaffimaskina.

Elektriskt tilfar, ið er serliga ætlað at brúka t.d. umborð á skipum og flogførum, er ikki fevnt av galdandi sterkstreymslóg, og skotið verður upp, at hetta heldur fram.

Viðvíkjandi elektriskum tilfari til nýtslu umborð á skipum, ásetur Sjóvinnustýrið ásetingar um bygging av skipum, útgerð og rakstur av skipinum. Av søguligum orsøkum eru tað klassingarfeløgini, ið góðkenna skip og maritima útgerð. Hetta kann vera radari á skipi. Fleiri altjóða sáttmálar, ES-direktiv og reguleringar frá Sjóvinnustýrinum krevja soleiðis, at skipini á hesum økjunum lúka tey krøv, ið klassingarfeløgini áseta. Elektriskt tilfar, ið er serliga ætlað til nýtslu umborð á skipi, er sostatt ikki fevnt av allýsingini í stk. 3 í uppskotinum.
Elektriskt tilfar, sum t.d. kann nýtast bæði á skipum ella í vanligum húsarhaldi, er tó fevnt av allýsingini. Tað kann eitt nú vera kaffimaskina. Hóast kaffimaskinan kann vera serframleidd, so hon virkar til nýtsluna á skipi, verður hon fevnd av allýsingini. Tað er tí bert elektriskt tilfar, ið er serliga ætlað til nýtslu umborð, ið ikki er fevnt av allýsingini í stk. 3 í uppskotinum. Samsvarandi er galdandi viðvíkjandi tilfari, ið er serliga ætlað til nýtslu í flogførum og í motorakførum.

Viðvíkjandi elektriskum tilfari á frálandaútbúnaði (havstøðum) verður víst til viðmerkingarnar beint omanfyri og til viðmerkingarnar til stk. 2.

Undantøk verða gjørd viðvíkjandi løðistikk, ið eru ætlað til elrikin motorakfør, tí slík løðistikk eru fevnd av galdandi lóg. Elbilar eru við tíðini vorðnir væl umtóktir, og løðistikk ætlað at vera partur av elbilum, verða fevnd av allýsingini í stk. 3 í uppskotinum.

Til § 3
Í § 3 verður skotið upp, at elektriskur útbúnaður og elektriskar innleggingar skulu gerast og rekast á ein slíkan hátt, at útbúnaður og innleggingar ikki eru til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

Av § 5 a, stk. 1 bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven gongur fram, at sterkstreymsútbúnaður skal verða gjørdur og rikin soleiðis, at hesi ikki seta trygdina fyri persónar, húsdjór ella eigindóm í vanda. Sum nevnt, verður mett, at reglurnar í kunngerðini er galdandi í Føroyum við teimum avmarkingum, sum føroysk lóggáva setur.

§ 3 í lógaruppskotinum inniheldur eitt alment trygdarkrav um, hvussu elektriskur útbúnaður og elektriskar innleggingar skulu gerast og rekast. Kravið er breitt orðað, tí ásetingin skal tryggja, at allur elektriskur útbúnaður og elektriskar innleggingar eru tryggar.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 1 í uppskotinum um týdningin av hugtakinum vandi.

Til § 4

Skotið verður upp í stk. 1, at elektriskt tilfar skal vera gjørt soleiðis, at tað við rættari innlegging, viðlíkahaldi og nýtslu, samsvarandi endamálinum við tí undir vanligum umstøðum, ikki er til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn.

Tað framgongur av § 10, stk. 1 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, at elektriskt tilfar skal vera gjørt soleiðis, at tað ikki er til vanda fyri trygdina hjá persónum, húsdjórum ella ognum, tá tað er rætt innlagt, viðlíkahildið og annars brúkt samsvarandi sínum endamáli.

§ 4 í lógaruppskotinum inniheldur alment trygdarkrav um, hvussu elektriskt tilfar skal vera gjørt. Tryggjast skal, at elektriskt tilfar á føroyska marknaðinum er gjørt á ein tryggan og rættan hátt, og at tað er trygt hjá brúkaranum at nýta. Kravið skal altíð vera lokið, tá elektriskt tilfar verður framleitt, sama um reglur ella standardir finnast fyri tilfarið. Elektriska tilfarið skal vera framleitt til annaðhvørt ta nýtsluna, sum framgongur av vegleiðingini til tilfarið, ella ta nýtslu, sum sniðið ella bygnaðurin á tilfarinum sigur.

Elektriska tilfarið skal framleiðast á slíkan hátt, at verja verður tryggjað mótvegis teimum vandum, ið standast av hita, ljósbogum ella geislingum. Vandi kann eisini standast av ávirkanum uttanifrá ella frá beinleiðis ella óbeinleiðis sambandi. Eitt nú kann bygnaðurin av elektriskum tilfari hava við sær, at tilfarið verður ovurhitað, sum kann elva til eldsbruna. Vandi við elektriskum tilfari kann eisini hava við sær váða fyri elektriskum stoyti.

Til § 5

Skotið verður upp í stk. 1, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um trygd fyri gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði, gerð og rakstur av elektriskum innleggingum, elektriskum tilfari og gerð og rakstur av øðrum útbúnaði nærhendis av ella í tilknýti til elektriskan útbúnað ella innleggingar.

Ætlanin er, at heimildin m.a. verður brúkt til áseting av nærri reglum, sum lýsa trygdarkravið í §§ 3 og 4 í uppskotinum nærri.

Eftir § 2, stk. 2 í galdandi sterkstreymslóg kann landsstýrismaðuri áseta nærri reglur um trygd fyri gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði, gerð og rakstur av elektriskum innleggingum, elektriskt tilfar, og ger og rakstur av øðrum útbúnaði nærhendis ella í sambandi við elektriskan útbúna ella elektriskar innleggingar.

Heimildin í § 2, stk. 2 í sterkstreymslógini at áseta nærri reglur er í § 2, stk. 4 nýtt til at seta sterkstreymsreglugerðina í gildi, sum er býtt upp í partar, sum t.d. snúgva seg um gerð av elvetingarútbúnaði, rakstur av elveitingarútbúnaði, arbeiði við elveitingarútbúnað, elektriskar innleggingar og hágspenningsinnleggingar og ger og nýtska av elektriskum tilfari.

Sum nevnt í almennu viðmerkingunum er ætlanin, at gerast skulu fleiri nýggjar kunngerðir um trygdarteknisk krøv fyri elektriskan útbúna, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar. Munurin millum reglurnar í dag er, at tað ikki verða ásett nágreinilig krøv á økjum, har standardar eru, ið tryggja neyðuga trygdarstøðið.

Serstakt fyri økið viðvíkjandi gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elektriskari orku verða eisini ásettar reglur um t.d. fráboðanarskyldu fyri rakstrarleiðarar um vanlukkur av eltrygdarligum slagi, sum hava samband við útbúnaðin, samsvarandi við galdandi reglunum um hetta. Samstundis er ætlanin, at heimildin kann verða nýtt til at áseta undantøk frá krøvum, ið verða sett til raksturin av einum elektriskum útbúnaði, t.d. eini heimavindmyllu ella sólkyknuskipan, har tað við atliti at teknisku trygdina ikki er neyðugt at seta krøvini. Tað snýr seg t.d. um krøvini um, at rakstrarleiðari skal vera settur, sum er góðkendur av Elnevndini, og at tað fyri ávísan útbúnað skal vera ein góðskuleiðsluskipan. Heimildin at áseta reglur um gerð og rakstur av øðrum útbúnaðum nærhendis ella í tilknýti til elektriskan útbúnað ella elektriskar innleggingar verður t.d. nýtt til at áseta trygdarreglur fyri byggiarbeiði, vegarbeiði o.a., nærhendis elektriskum útbúnaði. Við atliti at teknisku trygdini kann tað verða neyðugt at áseta krøv til gerð og rakstur av øðrum sløgum av útbúnaði nærhendis ella við tilknýti til elektriskan útbúna ella elektriskar innleggingar. Krøv um skjalprógv verða ikki ásett fyri hendan útbúnaðin.

Skotið verður upp í stk. 2, at landsstýrismaðurin kann áseta krøv um skjalprógvan fyri gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum umframt fyri elektriskt tilfar, sbr. stk. 1, nr. 1-3.

Skotið verður upp, sum nýggj heimild, at landsstýrismaðurin harafturat kann áseta krøv um skjalprógvan fyri bæði elektriskan útbúna, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar. Tað verður neyðugt at áseta reglur um slíka skjalprógvan, tá nýggju kunngerðirnar væntast at geva fleksiblar møguleikar fyri t.d. at gera ein útbúna ella eina innlegging eftir evropiskum ella altjóða standardum ella á annan hátt, sum lýkur grundleggjandi trygdarkrøvini, tá tað ikki eru ásettar bindandi reglur fyri økið.

Sum nevnt í almennu viðmerkinginum, verður arbeitt við at dagføra løggildingarlógina og at leggja uppskot fram í heyst. Ætlanin er, at tað skal verða krav, at elinnleggingarfyritøkur skulu hava góðskuleiðsluskipanir, og at tær har skulu skráseta upplýsingar um endaroyndarkoyringar á elinnleggingum. Sostatt fara tað við nýggju lóggávuni um løggilding av elinnleggjarum at verða gjørdar skjalprógvanir, sum eru knýttar at einstøku innleggingini, og mett verður tí, at tær kravdu upplýsingarnar partvíst fara at verða fevndar av skylduni hjá elinnleggingarfyritøkum at goyma upplýsingar í góðskuleiðsluskipanini.

Fylgjandi ES- direktiv, sett í gildi í Danmark,

- Evropatingsins og Ráðsins 2006/95/EF direktiv frá 12. desembur 2006 um tillagan av lóggávu limalandanna viðvíkjandi elektriskum tilfari, ið er roknað til nýtslu innan fyri ávís spenningsmørk (lágspenningsdirektivið),
- Evropatingsins og Ráðsins direktiv 94/9/EF frá 23. mars 1994 viðvíkjandi tillaging av lóggávu limalandanna um útgerð og tryggingarskipanir til nýtslu í spreingikvæmum umhvørvi (ATEX-direktivið).
- Láspenningsdirektivið er sett í gildi í Danmark við "bekendtgørelse nr. 797 af 30. august 1994 om ikraftræden af EF-direktiv om tilnærmelse af medlemsstaternes lovgivning om elektrisk materiel bestemt til anvendelse inden for visse

LM-087/2020

spændingsgrænser, som ændret ved EF-direktiv om ændring af bl.a. EF-direktiv om elektrisk materiel bestemt til anvendelse inden for visse spændingsgrænser."

ATEX- direktivið er sett í gildi í Danmark við bekendtgørelse nr. 697 af 18. august 1995 om elektrisk materiel og elektriske sikringssystemer til anvendelse i eksplosionsfarlig atmosfære. Direktivini innihalda krav nýtslu av standardum og um serliga tekniska dokumentasjón um, at tilfarið er í samsvari við standardarnar, samsvarsváttan um tað og CE- merking.

Í § 13, stk. 3 í fyrisitingarkunngerðini er ásett, at handlandi, framleiðarar og innflytarar av elektriskum tilfari hava skyldu at lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at meta um, hvørt tilfarið er lógligt. Undir hesum kann verða kravt, at fyri tilfar, sum er fevnt av láspenningsdirektivinum, sbr "bekendtgørelse nr. 797af 30. august 1994", verður løgd fram samsvarsváttan og teknisk dokumentasjón um, at tilfarið er í samsvari við standardarnar.

Lágspenningdirektivið er ikki sett í gildi í Føroyum og meira ivasamt er, um reglurnar í Direktivunum, um serligt tekniskt dokumentasjónskrav og samsvarsváttan, eru í gildi í Føroyum.

Í stk. 3 er heimilað, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri eltilfar, sum er fevnt av ES-regulering um elektriskt tilfar. Ætlanin er í nýggju kunngerðunum at seta líknandi krøv um skjalprógvan um, at tilfarið lýkur trygdarkrøvini, sum sett verða í direktivunum.

Til § 6
Í stk. 1 verður skotið upp, at Elnevndin í serligum førum kann gera undantak frá krøvum í reglum, ásett í sbrt. § 5, stk. 1. Elnevndin ásetur treytir fyri undantøk.

Í § 8 í kunngerð nr. 171 frá 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari kann Elnevndin gera frávik frá reglunum í kunngerðini, og ásett er, at tær neyvari reglurnar um hetta verða ásettar í sterkstreymsreglugerðini.

Í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, er í § 16 ásett heimild at gera frávik frá teknsiku ásetingunum í sterkstreymsreglugerðini.

Í uppskotinum til ásetingin er greið heimild til at gera frávik frá reglum, ið eru ásettar sbrt. § 5 í uppskotinum, um umstøðurnar tala fyri hesum. Frávik kunnu tó bert gerast í ítøkiligum førum og ikki til tess at greiða almennar spurningar, ið eiga at loysast við almennum reglum. Tí ber ikki til at gera frávik, ið eru ætlað at hava almennan virknað.

Umsóknir um frávik verða altið viðgjørdar, eftir at tað er gjørd ein váðameting og verða mettar ítøkiliga og individuelt. Dentur verður lagdur á, at váðametingin visir, at eingin váði er, ella at váðin er lítil eftir umstøðunum. Dentur verður somuleiðis lagdur á, at serlig viðurskifti í Føroyum kunnu tala fyri fráviki.

Fyri at umsókn um frávik kann verða viðgjørd, eigur umsóknin at upplýsa veruligu umstøðurnar, t.d. nær innleggingin varð gjørd, umstøður um verju mótvegis elektriskum stoyti, nýtslu, útbreiðslu, tal av isetingarstøðum, plássviðurskifti, staðseting í mun til umhvørvi osfr. Harumframt eigur umsóknin at hava grundgeving, t.d. um hví tað ikki er møguligt at útinna innleggingina sbrt. galdandi reglum, hvat er gjørt til tess at røkka einum samsvarandi trygdarstøði umframt ein møguligan tíðarkarm. Aðrar viðkomandi upplýsingar kunnu vera t.d. eftirlitsfrágreiðingar, myndir ella tekningar.

Frávik kann annaðhvørt vera tíðaravmarkað ella varandi. Tíðaravmarkað frávik verður vanliga givið, um ikki ber til at lúka innleggingarásetingarnar innan fyri eina ávísa tíðarfreist, t.d.í sambandi við kravið um ískoytisvernd til ólagsstreymavbrótaranum í verandi innleggingum. Varandi frávik verður vanliga givið, um ikki er møguligt ella skilabest at lúka innleggingar ásetingarnar.

Tá frávik verða givin, kunnu treytir fylgja við. Tað kann t.d. vera krav um frástøðu, staðseting av útgerð ella krav um niðurgrevstur av káplum undir liðugtgjørdum lendi. Elnevndin metir um, hvørt treytir skulu setast fyri, at frávik kann verða givið.

Viðmerkjast skal, at Elnevndin kann einans gera frávik frá reglum sbrt. § 5 og ikki frá standardum.

Eftir § 15 bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven kann Elnevndin í ítøkilugum førum, sum tað ikki er lagt upp fyri í teknisku ásetingunum, seta serlig trygdarkrøv, um Elnevndin metir tað neyðugt.

Í stk. 2 verður skotið upp, at Elnevndin í serligum førum, har umstøðurnar gera tað neyðugt, kann seta serlig trygdarkrøv, sum víkja frá krøvum í reglum, ið eru ásett sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-4, ella seta krøv um serliga merking ella vegleiðing í sambandi við elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar.

Stk. 2 í uppskotinum gevur møguleika fyri at seta serlig trygdarkrøv til bæði elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar, har ásettu reglurnar sbrt. § 5 ikki eru nøktandi til at lúka almennu trygdarkrøvini í §§ 3 og 4 í uppskotinum.

Serlig trygdarkrøv kunnu bert setast í ítøkiligum førum og ikki fyri at loysa almennar spurningar, sum eiga at loysast vil almennum reglum. Tí ber ikki til at seta serlig trygdarkrøv, sum bera brá av almennari lóggávu. Møguleikin at seta serlig trygdarkrøv verður serliga viðkomandi í teimum førum, tá trygdarkrøvini ikki hava fylgt við tøkniligu menningini, og har tað er umráðandi at sleppa undan møguligan vanda, sum galdandi reglurnar ikki taka hædd fyri. Fyri at seta serlig trygdarkrøv, ið víkja frá ásettum reglum sbrt. § 5, skal Elnevndin gera eina váðameting, sum kann lýsa orsøkina til, at neyðugt er at áseta serlig trygdarkrøv. Gerast skal altíð ein meting, bæði ítøkiliga og individuelt, har t.d. dentur verður lagdur á, um váðametingin vísir, at størri váði ella ókendur váði er til staðar. Somuleiðis kann dentur leggjast á, at serlig viðurskifti gera seg galdandi í Føroyum, ið gera strangari trygdarkrøv enn neyðug.

Harumframt gevur ásetingin eisini møguleika fyri at seta krøv um serliga merking ella vegleiðing viðvíkjandi elektriskum útbúnaði, elektriskar innleggingar og elektriska útgerð. Tað kann eitt nú vera merking um vanda ella vegleiðing um serlig viðurskifti.

Til § 7

Í stk. 1 verður skotið upp, at tann, ið gerð ella rekur elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar, skal fylgja ásettum reglum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2. Um reglur, ið eru ásettar sbrt. hesum, vísa til standardir, verður trygdarkravið í § 3 roknað sum lokið, um ásettu reglurnar og teir standardir, sum reglurnar vísa til, eru fylgdir.

Eftir § 5 a. stk. 2 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven skulu sterkstreymsútbúnaður lúka teknisku ásetingarnar, ið eru ásettar í sterkstreymsreglugerðini fyri tey einstøku sløgini av útbúnaði.

Fyri at lúka almennu trygdarkrøvini skulu elektriskir útbúnaðir og elektriskar innleggingar eftir fyrisitingarkunngerðini lúka tær teknisku ásetingarnar, sum eru settar í sterkstreymsreglugerðini. Eru tað ikki ásetingar í sterkstreymsreglugerðini, verður trygdarkravið mett lokið, um útbúnaðurin ella innleggingin lýkur evropiskar ella altjóða standardir. Eru heldur ikki slíkir standardir, skal tað skjaprógvast, hvussu trygdarkravið verður lokið, svarandi til tað tekniksu trygd, sum teknisku ásetingarnar í stekstreymsreglugerðinini veita.

Hetta merkir í fyrsta lagi, at teknisku ásetingarnar í sterkstreymsreglugerðini skulu verða fylgdar, og at evropiskir og altjóa standardir bert kunnu verða nýttir, um tað ikki eru ásetingar í sterkstreymsreglugerðini, t.v.s. at ásetingarnar í sterkstreymsreglugerðini eru bindandi reglur. Í øðrum lagi, at tað ikki ber til at víkja frá evropiskum ella altjóða standardum.

Stk. 1 í uppskotinum ásetur, at eru reglur ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2 í lógaruppskotinum, skal tann, ið gerð ella rekur elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar, fylgja hesum reglum. Ásett verður eisini, at um tað í hesum reglum verður víst til standardir, verður trygdarkravið í § 3 roknað sum lokið, um tann, ið gerð ella rekur elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar, hevur fylgt ásettu reglunum og teimum standardum, sum reglurnar vísa til.

Tað merkir t.d., at tann, ið gerð eina innlegging, kann velja at gera innleggingina sbrt. ásettu reglunum í § 5 og teimum standardum, sum tað í ásettu reglunum verður til, og verður trygdarkravið í § 3 í lógaruppskotinum tá roknað sum lokið.

Skotið berður upp í stk. 2, at verða teir standardir, sum nevndir eru stk. 1, ikki nýttir ella verða teir bert lutvíst nýttir, skal tað skjalprógvast á hvønn hátt trygdarkravið í § 3 er lokið. Skjalprógvan skal gerast á føroysku, donskum ella enskum.

Tað fylgir av § 5 a, stk. 5 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, at eru slíkir standardir ikki tøkir, sum nevndir eru í stk. 3-4 í ásetingini, skal tað skjalprógvast á hvønn hátt trygdarkravið er lokið. Galdandi rættarstøða merkir sostatt, at veruligur møguleiki er ikki fyri at víkja frá einum galdandi standardi.

Stk. 2 í uppskotinum ásetur nýggja meginreglu um, at tann, ið gerð ella rekur elektriskan útbúnað ella elektriskar innleggingar, skal ikki vera bundin av at nýta teir standardir, ið víst verður til í ásettu reglunum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2. Ásettu bindandi reglurnar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2 skulu altíð lúkast.

Við hesum verður fyri einstøku fyritøkuna, sum projekterar og gerð innleggingina, frælsi at velja í mun til gerð ella rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum. Tað merkir t.d., at ein innleggarfyritøka kann velja at gera eina innlegging sbrt. teimum reglum, ið eru ásettar í kunngerðum sbrt. § 5 og teimum standardum, ið víst verður til í hesum kunngerðum, og soleiðis lúka trygdarkravið í § 3 í lógaruppskotinum.

Heldur enn at nýta teir standardar, ið víst verður til í ásettu reglurnum sbrt. § 5, kann elinnleggingarfyritøkan velja aðra loysn, sum gevur eitt trygdarstøði, ið ikki er til vanda fyri

persónar, húsdjór ella ognir. Innleggingin skal hava í minsta lagi sama trygdarstøði, hon hevði havt, varð hon gjørd sbrt. teimum standardum, ið víst verður til í ásettu reglunum sbrt. § 5. Ein fortreyt fyri hesum fleksibilitetinum í valinum av innleggingarloysn er, at fyritøkan, sum gerð innleggingina, skjalprógvar, at trygdarkravið í § 3 er lokið. Hendan skjalprógvan skal fráboðast Elnevndini. Skjalprógvanin skal vera á føroyskum, donskum ella enskum.

Kommenteret [HD38]: Spurningurin er hvørji skjalprógv tølan skal verða um, hvussu hesi skulu viðgerast og av hvørjum, og hvat eftirlit annars skal verða. Fyrr enn viðkomandi uppskot til kunngerð fyriliggja ber ikki til at fyrihalda seg til nýggju skipanina.

Skotið verður upp í stk. 3, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um skjalprógvan sbrt. stk. 2. Ætlanin er, at heimildin t.d. verður nýtt til áseting av reglum um, hvørjar tekniskar skjalprógvanir, ið skulu gerast fyri at skjalprógva, at trygdarkravið er lokið í teimum førum, har teir standardir ikki verða nýttir, sum vístir verða til í ásettu reglunum sbrt. § 5.

Kravdu skjalprógvanirnar kunnu t.d. vera tekningar og onnur skjalprógv um, at innleggingin er yvirstreymsvard og vard undir ólagsviðurskiftum umframt skjalprógvan um, at grundverja er framd.

Til § 8

Skotið verður upp í stk. 1, at tann, ið framleiðir elektriskt tilfar, sum ikki er fevnt av ásettum reglum sbrt. § 5, stk. 3, skal fylgja ásettum reglum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3. Er í reglum, ásettum sbrt. hesum, víst til standardar, verður trygdarkravið í § 4 roknað fyri lokið, um ásettu reglurnar og teir standardar, sum reglurnar vísa til, eru fylgdar.

§ 1 í kunngerð nr. 171 frá 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari er um trygdarkrøv til eltilfar ásett, at "eltilfar skal vera framleitt á slíkan hátt, at tað við rættari innlegging og røttum viðlíkahaldi og eisini við nýtslu samsvarandi við endamáli tess ikki hóttir trygdina fyri persónar, húsdjór og ogn."

Í stk. 2 í kunngerðini er ásett, at trygdarkravið bert verður lokið, tá ið tilfarið er framleitt samsvarandi reglunum í sterkstreymsreglugerðini. Tó verður mett, at trygdarkravið eisini er lokið, um prógvað verður fyri elnevndini, at tilfarið er gjørt samsvarandi altjóða góðkendum reglum, og soleiðis sum tað er tilevnað, veitir trygd svarandi til ta trygd, ið ætlast at verða fingin við fyriskipanunum í sterkstreymsreglugerðini viðvíkjandi sama slag av tilfari.

Sbrt. § 10, stk. 4 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven skal elektriskt tilfar, ið ikki er fevnt av kunngerðum, sum eru settar í gildi sbrt. donsku sterkstreymslógini til at gjøgnumføra ES-direktiv, vera framleitt í samsvari við teknisku reglurnar í sterkstreymskunngerðini. Víst verður til viðmerkingarnar til § 5 um ES-direktivini.

Stk. 1 í uppskotinum ásetur, at fyri elektriskt tilfar, sum ikki er fevnt av reglum, ásettar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3 (ES_regulering), skal tann, ið framleiðir elektriskt tilfar fylgja ásettum reglum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3. Eisini verður ásett, at um tað í hesum reglum verður víst til standardir, verður trygdarkravið í § 4 roknað sum lokið, um tann, ið framleiðir elektriskt tilfar, hevur fylgt teimum ásettu reglunum og teimum standardum, sum reglurnar vísa til.

Tað merkir, at ein framleiðari kann velja at framleiða elektriskt tilfar eftir reglum, ið eru ásettar sbrt. § 5 og teimum standardum, ið víst verður til, og verður trygdarkravið í § 4 í lógaruppskotinum tá roknað fyri at vera lokið.

Skotið verður upp í stk. 2, at vera standardir, sum nevdir í stk. 1, ikki nýttir ella bert lutvíst nýttir, skal tað skjalprógvast á hvønn hátt, ið trygdarkravið í § 4 er lokið. Skjalprógvanin skal vera á føroyskum, donskum ella enskum.

Í § 1, stk., 3 í kunngerð nr. 171 frá 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari er ásett, at á eltilfari ella – um hetta ikki ber til – í frágreiðing, sum er hjáløgd, skulu verða tilskilaðar slíkar meginupplýsingar, ið eru ein treyt fyri, at tilfarið kann verða nýtt samsvarandi endamáli sínum og uttan vanda. Upplýsingarnar skulu verða orðaðar á føroyskum, donskum, norskum ella svenskum. Umframt skulu framleiðslu- ella vørumerki verða sett týðiliga á tilfarið ella – um hetta ikki ber til – á pakkitilfarið.

Skotið verður upp í stk. 3, at tann, ið framleiðir elektriskt ella innflytir elektriskt tilfar til Føroyar, hevur ábyrgd av, at allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri, at elektriska tilfarið kann verða nýtt uttan vanda og í samsvari við endamálið við tilfarinum, eru greitt merktar á elektriska tilfarið. Er hetta ikki gjørligt, skulu upplýsingarnar síggjast í viðlagdari vegleiðing. Upplýsingarnar skulu vera á føroyskum ella donskum.

Í stk. 3 í uppskotinum liggur ábyrgdin av, at allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri, at elektriska tilfarið kann verða nýtt uttan vanda og í samsvari við endamálið við tilfarinum, hjá viðkomandi, ið framleiðir elektriskt tilfar, ella viðkomandi, ið innflytir elektriskt tilfar til Føroyar. Við hesum verður greitt ásett, hvør, ið hevur hesa ábyrgd.

Váðar kunnu vera knýttir at nýtslu av elektriskum tilfari. Tí er umráðandi við atliti til trygdina hjá brúkarunum, at elektriska tilfarið hevur greiða kunning, so hon kann nýtast til sítt endamál og uttan at vanda fyri brúkarar. Um ikki ber til at seta vegleiðing á elektrisku útgerðina, tilfarið, skulu upplýsingarnar síggjast í viðlagdari vegleiðing. Brúkarin skal vera førur fyri at skilja kunningina, og tí skulu upplýsingarnar vera skrivaðar á føroyskum ella donskum.

Sum nýggja reglu í stk. 4 verður skotið upp, at tann, ið framleiðir elektriskt tilfar sum samlisett ella innflytur elektriskt tilfar sum samlisett til Føroyar, hevur ábyrgd av, at vegleiðing er viðløgd, soleiðis at elektriska tilfarið lýkur § 4, um vegleiðingin verður fylgd. Sama er galdandi fyri tilhoyrslutir til elektriskt tilfar.

Sbrt. stk. 4 í uppskotinum liggur ábyrgdin av, at vegleiðing fylgir við viðkomandi, ið framleiðir elektriskt tilfar, t.d. framleiðarin ella tann, ið innflytur elektriskt tilfar sum samlisett til Føroyar. Tað stendur nú greitt í lógaruppskotinum, hvør hevur hesa ábyrgd.

Ein líknandi ábyrgd er galdandi fyri tann, ið framleiðir tilhoyrslutir til elektriskt tilfar ella tann, ið innflytur tilhoyrslutir til elektriskt tilfar til Føroyar.

Dømi um elektriska útgerð, sum verður latin sum samlisett, er ljósskipan til eini høli. Her skal lýsing fylgja við, sum sigur, hvussu íseting og uppseting skal gerast.

Í stk. 5 verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um skjalprógvan sbrt. stk. 2. Ætlanin er, at heimildin t.d. verður nýtt til at áseta reglur um, hvør teknisk skjalprógvan skal gerast fyri at skjalprógva, at trygdarkravið í § 4 í lógaruppskotinum er lokið í teimum førum, har teir standardar ikki verða nýttir, sum víst verður til í ásettu reglunum sbrt. § 5.

Kravda skjalprógvanin kann t.d. vera tekningar, royndarfrágreiðingar og líknandi skjalprógvan, sum vísir, at elektriska tilfarið stendur mát við trygdarkravið.

Til § 9
Í stk. 1 verður skotið upp, at eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði hevur ábyrgd av, at útbúnaðurin heldur ásettu reglunar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1 umframt trygdarkravið í § 3.

Tað framgongur av galdandi lóggávu, § 5 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, at eigari ella brúkari skal siggja til, at útbúnaðurin lýkur ásetingarnar í sterkstreymsreglugerðini.

Stk. 1 í uppskotinum leggur ábyrgdina av elektriska útbúnaðinum á tann, sum mest natúrliga ber ábyrgdina, nevniliga eigaran ella brúkaran av útbúnaðinum. Tað er eigarin ella brúkarin, ið er næstur at bera hesa ábyrgd, eins og tað er eigarin ella brúkarin, ið hevur bestu møguleikarnar at fáa útbúnaðin gjørdan lógligan, um útbúnaðurin ikki lýkur ásettu reglurnar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1 og trygdarkravið í § 3.

Skotið verður upp í stk. 2, at eigarin ella brúkarin av elektriskum útbúnaði hevur ábyrgdina av, at útbúnaðurin verður rikin og hildin við líka á fullgóðan hátt í samsvari við ásettu reglurnar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1. Eigarin ella brúkarin av elektriskum útbunaði skal siggja til, at bøtt verður um feil og manglar skjótast gjørligt, umframt skjótast gjørligt seta tiltøk í verk, fyri at forða, at feilir og manglar kunnu elva til vanda, smbr. § 3.

Vandi skal skiljast, sum skrivað í § 3 í uppskotinum, sum vandi fyri persónar, húsdjór ella ognir.

Eigari av elektriskum elveitingarútbúnaði hevur eftir § 5, stk. 1 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven ábyrgdina av, at útbúnaðurin verður rikin av einum kvalifiseraðum rakstrarleiðara, soleiðis at útbúnaðurin ikki er til vanda fyri persónar, húsdjór ella ogn. Útbúnaðurin skal gerast, rekast og haldast við líka í samsvari við tær teknisku reglurnar, sum eru ásettar í sterkstreymsreglugerðini, ella um tað ikki eru ásetingar í stekstreymsreglugerðini í samsvari við evropiskar ella altjóða standardar.
Tað verður hildið vera skilabest, at § 9 í uppskotinum ikki setur ávís krøv til raksturin av elektriskum útbúnaðum, men einans vísir til, at tað er eigarans ábyrgd, at útbúnaðurin verður rikin sbrt. ásettu reglunum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1 í uppskotinum.

Eins og tað er eigari ella brúkari, ið hevur ábyrgdina av útbúnaðinum, er tað somuleiðis eigari ella brúkari, ið hava viðlíkahaldskyldu sbrt. stk. 2 í uppskotinum. Hetta verður grundgivið við, at eigari ella brúkari eru næstir til at hava hesa ábyrgdina. Skyldan áliggur brúkara, t.d. leigara, um tað er leigari, ið hevur viðlíkahaldsskylduna, ella um tað er leigarin, ið hevur møguleika fyri at siggja feilir og manglar.

Í stk. 3 verður skotið upp, at eigari ella brúkari av elektriskum útbúnaði skal vísa ansni við atliti til at forða fyri, at útbúnaðurin verður yvirlastaður.
Skyldan at vísa ansni við atliti til at forða fyri, at elektriski útbúnaðurin verður yvirlastaður áliggur eigaranum av útbúnaðinum. Um eigarin ikki sjálvur er brúkari av útbúnaðinum, liggur skyldan á brúkaranum, eitt nú leigara.

Til § 10
Ábyrgd av elektriskum innleggingum er galdandi lóggávu, § 5 í fyrisitingarkunngerðini, hjá eigara ella brúkara av innleggingini.

Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging skal eftir kunngerðini vísa ansni til tess at forða fyri, at innleggingin verður ovbyrjað.

Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging hevur eftir kunngerðini ábyrgdina av, at innleggingin verður rikin og viðlíkahildin á fullgóðan hátt, og skal fáa í rættlag feilir og manglar skjótast gjørligt, umframt skjótast gjørligt seta tiltøk í verk til tess at forða fyri, at feilir og manglar kunnu hava við sær vanda.

Eigari ella brúkari av elektriskari innlegging hevur eftir kunngerðini skyldu at halda reglurnar um rakstur og viðlíkahald av innleggingum, sum eru ásettar í sterkstreymsreglugerðini um elektriskar innleggingar, ella um tað ikki eru ásetingar í stekstreymsreglugerðini í evropiskum ella altjóða standardum.

Í stk. 1 verður skotið upp, at eigari ella brúkari av elektriskari innlegging hevur ábyrgdina fyri, at innleggingin lýkur ásettu reglurnar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 2 umframt trygdarkravið í § 3.

Uppskotið til ásetingina í stk. 1 merkir, at tað er eigari ella brúkari av eini elektriskari innlegging, ið skal síggja til, at innleggingin lýkur ásettum reglum sbrt. § 5, stk. 1, nr. 2 og trygdarkravið í lógaruppskotinum § 3.

Ásetingin leggur soleiðis ábyrgdina fyri elektrisku innleggingina á mest natúrliga ábyrgdarsubjektið, nevniliga eigaran ella brúkaran av innleggingini. Tað er eigari ella brúkari, ið er næstur at bera hesa ábyrgdina, eins og tað er eigari ella brúkari, ið hevur besta møguleika at fáa innleggingina lógliga, um hon ikki lýkur ásettu reglurnar sbrt. § 5, stk. 1, 2 í lógaruppskotinum umframt trygdarkravið í lógaruppskotinum § 3.

Skotið verður upp í stk. 2, at eigari ella brúkari av elektriskari innlegging hevur ábyrgdina av, at innleggingin verður rikin og hildin við líka á fullgóðan hátt í samsvari við ásettu reglurnar sbrt. § 5, stk. 1, nr. 2. Eigarin ella brúkarin av elektrisku innleggingini skal bøta um feilir og manglar umframt skjótast gjørligt seta tiltøk í verk at forða fyri, at feilir og manglar kunnu elva til vanda, smbr. § 3.

Eins og tað er eigari ella brúkari, ið hevur ábyrgdina fyri innleggingini, er tað somuleiðis eigari ella brúkari, ið hevur viðlíkahaldsskyldu, tá hesin er næstur at hava hesa ábrygdina. Eigari ella brúkari er samstundis næstur til at reka innleggingina á fullgóðan hátt og í samsvari við ásettum reglum sbrt. hesum lógaruppskotinum. Bæði skyldan at reka innleggingina og at halda hana við líka liggur á brúkara, t.d. leigara, um tað er leigari, ið skyldan er avhendað til, ella um tað er leigari, ið hevur møguleika fyri at varnast feilir og manglar.

Skotið verður upp í stk. 3, at eigari ella brúkari av elektriskari innlegging skal vísa ansni fyri at forða fyri, at innleggingin verður yvirlastað.

Skyldan at vísa ansni viðvíkjandi at forða fyri, at innleggingin verður yvirlastað, liggur hjá eigara av innleggingini. Um eigari ikki sjálvur er brúkari av innleggingini, liggur skyldan hjá brúkara, so sum leigara.

Eigari ella brúkari skal eitt nú syrgja fyri, at ikki ov nógv elektriskt tilfar verður íbundið eini innlegging, soleiðis at innleggingin verður ovbyrjað, eins og eigari ella brúkari t.d. skal syrgja fyri, at leidningar eru óskalaðir og verða fyri ov hørðum trýsti.

Til § 11
Skotið verður upp í § 11, at tann, ið rekur elektriskan útbúnað til útbreiðslu av elektriskari orku, skal ikki seta sum treyt fyri veiting av ravmagni til brúkararnar strengari trygdarkrøv, enn ásettu reglurnar sbrt. § 5, stk. 1.

Elektriskur útbúnaður fevnir sbrt. allýsingini í § 2, stk. 1 í uppskotinum t.d. um útbúnað til útbreiðslu av elektriskari orku.

Ásetingin hevur ikki til endamáls at regulera hvørji krøv, ið verða sett teimum, t.d. smærri privatum vindmylluframleiðarum, sum lata elektrisitet aftur til netið hjá SEV, og tí skal ásetingin bert fevna um veiting av elektrisiteti til endabrúkaran.

Til § 12
Í § 9 í sterkstreymslógini er ásett, at tann, ið rekur sterkstreymsútbúnað, hevur skyldu at endurrinda tann skaða á persón ella ognir, sum standast av útbúnaðinum, uttan so at tað verður upplýst, at hin skaddi sjálvur við vilja ella av óansni hevur verið orsøk til skaðan, ella at skaðin ikki kundi havt verið forðaður við tí sketni ella umhugsan, sum raksturin av slíkum útbúnaði krevur bæði viðvíkjandi rakstarhátti og tilfari.

Í § 10 í sterkstreymlógini er ásett, at tann, sum verður fyri skaða, hevur rætt til endurgjald, ikki bara fyri tann skaða, sum hann beinleiðis líður, men eisini fyri tær útreiðslur, vinnumiss og ampar, ið harav standast. Er persónskaði, verður at rinda endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, heilsubótarútreiðslur og annan miss, sum stendst av skaðanum, og eina samsýning fyri sviða og pínu. Hava varandi fylgjur staðist av skaðanum, verður eisini at rinda samsýning fyri varandi mein og endurgjald fyri miss ella skerjan av vinnunevni. Virðið av arbeiði í heiminum verður sett javnt við vinnuinntøku. Við deyða skal endurgjald verða goldið fyri rímiligar jarðarferðaútreiðslur og endurgjald til tann, ið við andlátið hevur mist uppihaldara. Uppihaldið fevni eisini um virðið av arbeiðinum hjá tí deyða í heiminum.

Í § 11 í lógini er ásett, at kann skaðin standast av fleiri sterkstreymsútbúnaðum, bera allir teir útbúnaðir (sbr. § 9) viðvíkjandi hvørjum, tað ikki kann verða prógvað, at skaðin ómøguliga kann verða elvdur av teimum, samábyrgd mótvegis tí, sum verður skaddur. Teir útbúnaðir, sum eru bundnir at rinda endurgjald, ábyrgdast javnt, um annar sáttmáli vantar.

Skotið verður upp í stk. 1, at tann, ið rekur elektriskan útbúnað, skal lata endurgjald fyri skaða á persón ella góðs, sum skipanin hevur verið atvold til, uttan so, at prógvað verður, at tað ikki kundi verið forðað fyri, at skaðin hendi við tí ansni og nærlagni, sum rakstur av elektriskarum útbúnaði krevur.

Talan er um endurgjaldsábyrgd sbrt. culpareglu við øvugtari prógvbyrðu, tá ið tann, ið rekur viðkomandi elveitingarskipan, fyri at vera leysur fyri endurgjaldsábyrgd, skal gera greiðu fyri, at skaðin ikki kundi verið forðaður við tí ansni og nærlagni, sum rakstur av elveitingarskipan krevur.

Skotið verður upp, at um skaðin kann standast av fleiri elektriskum útbúnaðum, hefta allir, ið reka útbúnaðir, samhaldsfast fyri tí skadda, um ikki tann, ið rekur eina av viðkomandi elektrisku útbúnaðunum kann greiða fyri, at skaðin ikki er hendur, orsakað av tí útbúnaðinum. Tey, ið reka útbúnaðir, ið eru orsøk til skaða, hefta fyri endurgjaldi, tá eingin annar sáttmáli er galdandi fyri hetta.

Stk. 2 í uppskotinum ásetur býtið av endurgjaldsrættarligu ábyrgdini og er ein seráseting um samhaldsfasta ábyrgd.

Til § 13
Eftir uppskotinum skal Elnevndin hava eftirlit við, at lógin og reglur, ásettar sbrt. lógini, verða hildnar.

Sbrt. § 3, stk. 1 í sterkstreymslógini, sbr. § 2, stk. 2, nr. 3 í kunngerð nr. 173 frá 21. september 1993 um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð v.m., hevur Elnevndin eftirlit við sterkstreymútbúnaði undir hesum innleggingum og elektriskum tilfari fyri at tryggja, at ásetingar í sterkstreymsreglugerðini verða hildnar.

Elnevndin er myndugleiki á økinum fyri elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar. Tí er avgerandi, at Elnevndin kann hava eftirlit á øllum økjum, ið eru fevnd av lógaruppskotinum, eins og galdandi er í dag. Møguleikarnir at hava eftirlit verða ikki víðkaðir í mun til tað, sum er galdandi í dag.

Eftirlit skal skiljast í breiðari merking, sum fevnir um bæði umsjón, marknaðareftirlit og marknaðaryvirvøku. Eftirlit kann sostatt vera bæði skriviborðseftirlit og eftirlit á staðnum. Eftirlit á staðnum kann vera bæði á almennum og privatum ognum og økjum. Ætlanin við ásetingini er, at Elnevndin ikki skal vera avmarkað í háttinum, nevndin ynskir at útinna eftirlitið.

Skotið verður upp í stk. 2, at Elnevndin kann krevja at fáa allar tær upplýsingar, ið eru neyðugar fyri útinnan av eftirliti eftir stk. 1. Samstundis verður ásett, at upplýsingarnar kunnu fáast við at venda sær til fyritøkur ella persónar, ið projektera, reka og gera elektriskan útbúnað ella elektriskar innleggingar umframt allar liðir í umsetningi av elektriskum tilfari.

Sbrt. § 4, stk. 1 í sterkstreymslógini, sbr. eisini § 3 í kunngerð nr. 171 frá 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari hava eigarar og nýtarar av sterkstreymsútbúnaðinum, virkiseigarar, innflytarar og tey, ið selja eltilfar, skyldu at geva allar upplýsingar, sum Elnevndin metir at vera neyðugar til tess at útinna eftirlitið.

Skylda at lata Elnevndini upplýsingar um eltilfar, er ásett í § 3 í kunngerð trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi eltilfari, sum er soljóðandi:
"§ 3. Við sølu, útflýggjan ella innlegging av eltilfari, sum ikki áður hevur verið marknaðarført, útflýggjað ella innlagt her í landinum, og sum er tikið við á yvirlitinum, sum DEMKO umsitur, skal ein og hvør, ið sum virkiseigari, innflytari, heilsølumaður, smásølumaður, elinnleggjari ella annað selur, útflýggjar ella leggur inn tilfarið prógva fyri elnevndini, at upplýsingar um tilfarið eru latnar DEMKO ella "Elektricitetsrådet". Upplýsingarnar verða latnar á einum serligum oyðublað, sum fæst hjá DEMKO."

Í 1993, tá sterkstreymslógin varð sett í gildi, var ein skipan í gildi í Danmark, har eltilfar í sambandi við, at tað varð marknaðarført, skuldi fráboðast DEMKO (Danmarks elektriske materielkontrol) fyri at verða skrásett. DEMKO kannaði síðani, um tilfarið var í samsvari við teknisku treytirnar, ella um tað møguliga hevði altjóða sertifikat frá fyrr gjordum kanningum, og um tilfarið var nøktandi, so var tað skrásett. Skrásetingarskyldugt tilfar var avmarkað til elektriskt tilfar, sum varð nýtt av vanliga brúkaranum.

ES metti hesa skipan við forhanda góðkenning og skráseting at vera ein teknisk handilsforðing og í stríð við reglurnar um innara ES-marknaðin. Í ES/EBS limalondunum byggja reglurnar um krøv til og eftirlit við elektriskum tilfari upp á felags standardir og sinamillum virðurkenning av eltilfari. Í ES/EBS skipanini er krav skjalprógvan um, at tilfarið er gjørt eftir standardunum og CE- merking av tilfarinum, sum sjónligt tekin upp á, at tilfarið er gjørt eftir standardunum.

Skipanin er ikki longur í gildi í Danmark, og ásetingin í § 3 í nevndu kunngerð hevur tí ikki verið virkin í praksis.

§ 13, stk. 3 í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven hava tey, ið selja, framleiða og innflyta elektriskt tilfar skyldu til at geva allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at meta, um útgerðin er løglig.

Krevjast kann, at samljóðarváttan og teknisk skjalprógvan fyri tilfarið, ið er fevnt av Evropatingsins og Ráðsins direktiv 2006/95/EF frá 12. desember 2006 um tillagan av løggávu limalandanna viðvíkjandi elektriskum tilfari, ið er ætlað til nýtslu innan fyri ávís spenningsmærk, lágspenningsdirektivið.

Upplýsingarskyldan er av stórum týdningi fyri, at Elnevndin kann útinna munadygt eftirlit. Metingin av, hvørjar upplýsingar skulu innsavnast í sambandi við eftirliti, verður altið gjørt út frá eini proportionalitetssmeting. Eitt nú kann eigari, brúkari, innleggjari ella annar viðkomandi virkisrekandi hava upplýsingar, sum Elnevndin skal brúka fyri at gera eftirlit. Hetta kann eisini vera ein, ið framleiðir elektriskt tilfar, ella umboð fyri hendan.

Viðmerkjast skal, at skotið verður upp, at ásetingin verður beinleiðis revsiáløgd, smbr. § 38, stk. 1, nr. 2. í uppskotinum. Verður upplýsingarskyldan ikki hildin, skal fráboðan til løgregluna gerast eftir ítøkiligari meting.

Ásetingin verður avmarkað av vanliga forboðnum ímóti sjálvinkriminering, sum t.d. framgongur av Evropiska Mannarættindarsáttmálanum grein 6 umframt § 10 í lóg nr. 442 frá 9. apríl 2004 um rættartrygd í sambandi við fyrisitingaliga nýtslu av tvingsilsinntrivum og upplýsingarskyldum. Er ítøkiligur illgruni um, at upplýsingarnar geva ábendingar um, at viðkomandi hevur framt nakað revsivert, kann sostatt ikki krevjast, at upplýsingarnar verða latnar. Í slíkum føri verður málið latið løgregluni til kanningar.

Skotið verður upp í stk. 3, at Elnevndin ella tann, sum er heimilaður § 23 í uppskotinum ikki má upplýsa fyri øðrum, at Elnevndin hevur fingið fráboðan frá einum arbeiðstakara ella umboð fyri hesum.

Mett verður, at tað eigur at verða tryggjað, at arbeiðstakarar navnleyst kunnu fráboða viðurskifti á arbeiðsplássum teirra til Elnevndina.

Uppskotið skal kunna nýtast í førum, har arbeiðstakari ella umboð arbeiðstakarans meldar arbeiðsgevaran fyri ikki at halda krøv til elektriskar innleggingar, elektriskar skipanir ella elektriska útgerð, sum ásett sbrt. lógaruppskotinum. Í hesum førum má Elnevndin ella heimilað eftir § 23 í uppskotinum, ikki upplýsa fyri øðrum, at ein eftirlitsvitjan fer fram eftir eini fráboðan. Við øðrum orðum skal skiljast eitt nú arbeiðsgevaran, umboð fyri hendan umframt fjølmiðlarnir.

Ásetingin hevur til endamáls at verja tann starvssetta fyri revsiatgerðum frá arbeiðsgevara, undir hesum serliga uppsøgn. Um fráboðari er farin úr starvi frá arbeiðsgevara, er fráboðari soleiðis ikki longur fevndur av verndaratlitinum.

Uppskotið er ein serregla (lex specialis) í mun til galdandi reglur um alment innlit eftir innlitslógini og fyrisitngarlógini.

Um ein partur eitt nú hevur rætt til skjalainnlit sbrt. fyrisitingarlógini, hevur Elnevndin eftir lógaruppskotinum skyldu til annaðhvørt ikki at lata viðari ella at anonymisera einhvørja upplýsing, sum ger tað møguligt at eyðmerkja tann arbeiðstakara ella umboð fyri hendan, sum hevur boðað frá brotinum.

Ásetingin er ikki forðing fyri at geva viðari upplýsingar um, at Elnevndin hevur móttikið eina fráboðan frá einum arbeiðstakara ella umboð fyri hendan, til eitt nú løgreglu og ákærumyndugleika í sambandi við rannsakan og rættarsøkn av revsiverdum viðurskiftum, ið eru fevnd av hesum uppskoti.

Upplýsingar um ein arbeiðstakara ella umboði fyri hendan skal skiljast í samsvari við allýsingina av persónsupplýsingum løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, har persónsupplýsingar fevna einhvørja upplýsing og meting knýtt at einum ávísum likamligum persóni.

Ásetingin fevir t.d. um upplýsingar, sum eyðmerkja fráboðaran út frá upplýsingunum um samleikan hjá hesum, ella einhvørjar upplýsingar, sum óbeinleiðis gera tað møguligt at gera niðurstøðu um samleikan hjá hesum. Upplýsingar, sum ikki eru gjørdar navnloyndar á ein slíkan hátt, at tann skrásetti ikki longur kann eyðmerkjast, eru ikki fevndar av hugtakinum persónsupplýsingar.

Í støðutakanini til, um ein persónur er eyðmerkbarur, skulu øll tey hjálparamboð, ið sannlíkt kunnu hugsast, tikin í nýtslu til tess at eyðmerkja viðkomandi, annaðhvørt av dátuábyrgdarhava ella av einhvørjum øðrum persóni, takast við.

Uttan fyri nýtsluøkið fyri ásetingina, ið her verður skotin upp, skulu galdandi reglur í innlitslógini um ítøkilig viðurskifti eru, sum tala fyri at ein fráboðan verður undantikin skjalainnliti.

Kommenterede [HD39]: Ógreið orðing

Til § 14

Skotið verður upp, at Elnevndin ella tann, ið nevndin heimilar til tað, til einhvørja tíð, við hóskandi samleikaprógvi og uttan dómsúrskurði, hevur atgongd til almenna og privata ogn og økir fyri at útvega upplýsingar til nýtslu í eftirlitinum eftir hesi lóg.

Sbrt. § 4, stk. 2 í galdandi sterkstreymslóg hava umboðsfólk hjá Elnevndini, uttan rættarúrskurð við at vísa hóskandi heimild, atgongd til allan sterkstreymsútbúnað og til øll høli, har eltilfar verður framleitt, selt, goymt ella nýtt.

Uppskotið til ásetingina hevur við sær, at atgongdin uttan rættarúrskurð til almenna og privata ogn verður víðkað í mun til galdandi áseting. Bakstøðið fyri hesum er, at tað ikki er gjørligt at avmarka nágreiniliga tey støð og øki, har tað er tørvur á, at Elnevndin kann útinna.

Ásetingin er neyðug, fyri at Elnevndin kann útinna munadygt eftirlit. Talan kann eitt nú vera um føri, har tørn, ið hevur framleitt elektriskt tilfar, kann fjala hetta fyri Elnevndini, um tað ikki verður givin atgongd til staðið, har tilfarið verður framleitt. Somuleiðis kann koma fyri, at eigari av eitt nú íbúðarinnlegging ikki gevur Elnevndini atgongd til íbúðina, sum so forðar Elnevndini at gera eftirlit sbrt. hesum lógaruppskotinum. Ásetingin kann soleiðis ikki avmarkast til bert at fevna um handilshøli, tí í privatum íbúðum eru eisini elektriskar innleggingar, ið eru fevndar av lógaruppskotinum. Hetta er í samsvari við ábyrgd eigara og brúkara í §§ 9-10 í uppskotinum.

Nýtsluøkið fyri ásetingini, sum skotin er upp, er víðkað í mun til, at hon ikki sum núverandi áseting er avmarkað til at fevna um sterkstreyútbúnað ella støð, har elektriskt tilfar verður framleitt, selt, goymt ella nýtt. Skotið verður upp, at ásetingin verður víðkað til at fevna um alla almenna og privata ogn og støð. Ásetingin kann verða nýtt í sambandi við eftirlitsvitjanir hjá eigara ella brúkara av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum umframt hjá teimum, ið framleiða elektriskt tilfar, umboðsfólkum teirra ella í sambandi við eftirlitsvitjanir í bakhølum hjá handlum.

Hinvegin er nýtsluøkið fyri ásetingini í uppskotinum avmarkað fyri tað málsevni, sum Elnevndin kann brúka ásetingina til, í mun til galdandi lóg. Sostatt er bert møguligt hjá nevndini at brúka ásetingina til at útvega upplýsingar til nýtslu í sambandi við eftirlit. Hetta kann eitt nú vera eftirlit, har frágreiðing verður skrivað um staðfestar feilir. Tað kann eisini vera møguleikin fyri at taka út elektriskt tilfarð á einum staði, ið ikki er alment atkomuligt. Endamálið við atgongdini skal sostatt vera, at upplýsingar skulu innsavnast, ið eru neyðugir fyri eftirlitið. Ásetingin kann verða nýtt bæði proaktivar eftirlitsuppgávur, har Elnevndin hevur lagt eftirlitsuppgávuna til rættis framman undan, og reaktivar eftirlitsuppgávur, sum oftast koma fyri eftir eina uttanhýsis hending, so sum eina vanlukku ella eina fráboðan.

Tað er ikki ein fortreyt fyri, at Elnevndin kann fáa atgongd eftir ásetingini, at nevndin hevur vitan um, at á staðnum eru vandamikil elektriskur útbúnaður ella elektriskar innleggingar ella vandamikið elektriskt tilfar. Fyri at nevndin kan útinna munadygt eftirlit, er neyðugt at fáa atgongd til støð, har nevndin ikki frammanundan veit, at vandamikil útbúnaður, vandamiklar innleggingar ella vandamikið elektriskt tilfar er, fyri á tann hátt at kunna innsavna vitan um, hvar vandamikil útbúnaður ella innleggingar ella vandamikið tilfar kann vera, og soleiðis leggja eftirlitið til rættis á munadyggasta hátt.

Um tað er neyðugt at fáa atgongd til almenna og privata ogn og økir valdast m.a., um Elnevndin á annan hátt kann fáa nøktandi upplýsingar til nýtslu í eftirlitinum. T.d. um upplýsingarnar verða sjálvboðið innsendar, ella um tær kunnu innsavnast á økjum, har tørvur ikki er á serstakari atgongd. Hvussu eftirlitið kann verða útint á munadyggasta hátt gongur inn í metingina av, um atgongdin kann metst at verða neyðug. Her er talan um eina proportionalitetsavvigan

Ásetingin er eisini galdandi fyri annan myndugleika netafelagið ella privata fyritøka, sum er heimilað eftir § 23 í uppskotinum.

Skotið verður upp í stk. 2, at løgreglan um neyðugt veitir Elnevndini stuðul. Hetta kann t.d. verða aktuelt í eini støðu, har Elnevndini verður noktað atgongd til eitt øki. Í slíkum føri kann tørvur vera á, at løgreglan nýtir vald, fyri at fáa atgongd til økið.

Til § 15

Skotið verður upp í § 15, at Elnevndin kann áleggja eigara ella brúkara av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging at lata løggildaða elinnleggjarafyritøku fremja eftirlit av útbúnaðinum ella av innleggingini fyri egnu rokning eigarans ella brúkarans.

§ 15 í lógaruppskotinum er tann minst inntrivandi møguleikin at geva boð, sum Elnevndin hevur í mun til elektriskan útbúnað og elektriskar innleggingar.

Ásetingin verður bæði viðkomandi at brúka í førum, har Elnevndin hevur verið á eftirlitsvitjan og í førum, har Elnevndin hevur orsøk at halda, at ein útbúnaður ella innlegging er vandamikil, men har Elnevndin ikki sjálv hevur staðfest ítøkiligar feilir ella manglar. Tað kunnu t.d. vera føri, har Elnevndin hevur framt eftirlit í einstakari íbúð í einum íbúðafelagi, og har tað er sannlíkt, at eitt staðfest brek í einari íbúð kemur fyri í øllum íbúðunum hjá íbúðafelagnum.

Eini boð um at lata eftirlit fara fram verður oftast boðað viðkomandi, ið eigur elektriska útbúnaðin ella elektrisku innleggingina. Tó kann eftir eini ítøkiligari meting, t.d. í vinnuleigumáli, vera viðkomandi at lata boðini til brúkara av útbúnaðinum ella innleggingini. Tað verður altíð tann, ið fær boðini borin, ið skal gjalda fyri, at eftirlitið verður framt.

Til § 16
Elnevndin hevur eftir § 3 í sterkstreymslógini eftirlit við gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum.

Viðvíkjandi galdandi reglum verður víst til pkt. 1.4.3 í almennu viðmerkingunum.

Skotið verður upp í § 16, at Elnevndin kann geva eigara ella brúkara av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging boð um at bøta um feilir og manglar við útbúnaðinum ella innleggingini fyri egnu rokning eigarans ella brúkarans.

§ 16 í lógaruppskotinum er ein meira inntrivandi møguleiki at geva boð, enn boð eftir § 15 í lógaruppskotinum við tað, at ásetingin krevur, at eigari ella brúkari bøtir um feilir og manglar við elektriska utbúnaðinum ella elektrisku innleggingini. § 16 í uppskotinum kann hugsast nýtt í sambandi við einum boðum eftir § 15, so tvinni boð verða givin.

Ásetingin verður t.d. viðkomandi at brúka í førum, har Elnevndin hevur verið á eftirlitsvitjan og staðfest feilir og manglar við elektriska útbúnaðinum ella elektrisku innleggingini ella í teimum førum, har ein løggildur elinnleggjari hevur staðfest feilir og manglar við útbúnaðinum ella innleggingini.

Eini boð um at bøta um feilir og manglar verða oftast fráboðað viðkomandi, ið eigur elektriska útbúnaðin ella elektrisku innleggingina. Í ítøkiligari meting, t.d. fyri vinnuleigumál, kann tó vera viðkomandi at fráboða til brúkara av útbúnaðinum ella innleggingini. Tað verður altíð tann, ið fær boðini, ið skal gjalda fyri at bøta um feilir og manglar.

Uppskotið hevur við sær broytingar í mun til galdandi lóg við tað, at eftir uppskotinum verður greið heimild til at áleggja eigara ella brúkara av elektriskum útbúnaði ella elektriskari innlegging at rinda kostnaðin av at fremja eftirlit av útbúnaðinum ella av innleggingini. Slík greið heimild er ikki í fyrisitingarkunngerðini við tað, at tað í kunngerð um ígildissetan av sterkstreymsreglugerð er ásett, at parturin í sterkstreymsreglugerðini um avgjald ikki skal verða nýttur í Føroyum.

LM-087/2020

Reglurnar, sum eru í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, verða eftir uppskotinum tiknar upp í lógina og heimildirnar, at geva boð um at bøta um feilir og manglar við útbúnaðinum ella innleggingini fyri egnu rokning eigarans ella brúkarans, verða greiðari.

Til § 17
Viðvíkjani galdandi reglum verður vist til pkt. 1.4.3 í almennu viðmerkingunum.
Skotið verður upp, at Elnevndin kann seta forboð at brúka elektriskan útbúnað og elektriska innlegging, ið ikki halda ásettu reglur sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2 ella trygdarkravið í § 3.
Stk. 1 í uppskotinum er tað mest inntrivandi tiltakið, sum Elnevndin kann seta í verk mótvegis elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum.

Forboðsmøguleikin kann t.d. brúkast í førum, har Elnevndin hevur staðfest, at ein útbúnaður ella innlegging ikki heldur ásettar reglur sbrt. § 5, stk. 1, nr. 1-2 ella trygdarkravið í § 3.
Forboð er eisini nýtiligt í førum, har tørvur er á at seta forboð fyri nýtslu av útbúnaði ella innlegging í einum tíðarskeiði, t.d. til eini boð um at bøta um feilir og manglar eru fylgd.
Skotið verður upp í stk. 2, at Elnevndin kann lata elveiting slíta til viðkomandi útbúnað ella viðkomandi innlegging fyri egnu rokning eigarans ella brúkarans, um eitt forboð eftir stk. 1 ikki verður hildið. Elnevndin kann geva netfelagnum boð um at slíta elveitingina, um forboð eftir stk. 1 verður brotið.

Um eitt forboð, sum er lýst sbrt. § 17, stk. 1 ikki verður hildið, kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar. Tí kann verða neyðugt at lata elveiting slíta til eina elektriska innlegging ella elektriskan útbúnað. Tað verður serliga neyðugt í førum, har vandamikil útbúnaðurin ella vandamikil innleggingin er atkomulig fyri mong, so sum innleggingar í vaskikjallarum ella innleggingar ella útbúnaður, ið eru alment atkomuligur. Elnevndi hevur tí tørv á møguleikanum at geva netfelagnum boð um at slíta veitingina.

Elnevndin hevur ikki sjálv møguleikan fyri at slíta elveiting og hevur tí tørv á hjálp til tað frá netfelsgnum. Um netfelagið ikki sjálvboði slítur, kann Elnevndin áleggja hesum at fremja streymslitið.

Skotið verður upp í stk. 3, at Elnevndin kann krevja kostnaðir av at slíta elveitingina endurrindaða av viðkomandi, ið fekk fráboðan um boð sbrt. stk. 1.

Elnevndin rindar í fyrsta umfari fyri at slíta streymin, men mett verður, at mest hóskandi er, um peningurin verður endurrindaður av viðkomandi, ið hevur brotið nýtsluforboð, tá hesin er beinleiðis orsøk til, at Elenvndin hevur útreiðslur av streymslitinum.

Reglurnar, sum eru í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, verða eftir uppskotinum tiknar upp í lógina, og heimildirnar verða greiðari, at Elnevndin kann lata elveiting slíta til viðkomandi útbúnað ella viðkomandi innlegging fyri egnu rokning eigarans ella brúkarans, um eitt forboð eftir stk. 1 ikki verður hildið og til, at Elnevndin kann geva netfelagnum boð um at slíta elveitingina, um forboð eftir stk. 1 verður brotið.

Til § 18
Viðvíkjani galdandi reglum verður vist til pkt. 1.4.3 í almennu viðmerkingunum.

LM-087/2020

Skotið verður upp í stk. 1, at Elnevndin uttan kostnað kann úttaka elektriskt tilfar til nýtslu til eftirlit sbrt. § 13, stk. 1.

Tað kunnu úttakast eitt ella fleiri eintøk av tilfarinum, alt eftir tørvi. Tað er góð fyrisitingarvenja at lata kvittan fyri tiknu eintøkini.

Elnevndin hevur ikki sjálv møguleika at gera tekniskar kanningar av tilfarinum, og Elnevndin má tí senda tilfarið til tekniskar kanningar á uttanhýsis royndarstovu. Tað skal til einhvørja tíð vera eitt endamál við útttøkuni og ein saklig orsøk til at taka tilfarið.

Byrjunarstøðið er, at elektriska tilfarið verður latið aftur skjótast gjørligt eftir kanning. Elnevndin kann tó hava tørv á at goyma tilfarið sum prótvilfar at brúka í møguligum rættarmáli. Tilfarið kann eisini vera so mikið skatt eftir kanning, at tað má vrakast. Um vinnurekandi ynskir skadda elektriska tilfarið afturflýggjað, verður hetta tó eisini gjørligt. Vinnurekandi kann tó ikki í øllum førum vænta at fáa tilfarið aftur, um tilfarið er oyðilagt í kanningini.

Skotið verður upp í stk. 2, at Elnevndin kann lata fremja tekniska kanning av elektriskum tilfari, sum er úttikið eftir stk. 1. Elnevndin kann krevja kostnaðirnar fyri uttanhýsis tekniskar kanningar endurrindaðar av viðkomandi, sum í sambandi við kanningina fær fráboðan um boð ella forboð sbrt. §§ 19 og 20, stk. 1-2.

Eftir uppskotinum kann kravið um endurrindan av kostanðinum bert verða sett, tá boð ella forboð er lýst. Tað verður mett at vera hóskandi, at tað er Elnevndinm sum í byrjunarstøðu rindar fyri kostnaðir fyri uttanhýsis tekniskar kanningar, ið metast vera neyðugar fyri at gera av, um inntriv skal fremjast, og at kostnaðirnir síðani kunnu leggjast á tann, ið fær fráboðan um boð ella forboð. Skotið verður upp, at tað bert er tann, ið fær fráboðan um boð ella forboð, ið skal rinda kostnaðir, meðan kostnaðir til uttanhýsis tekniskar kanningar, ið ikki hava við sær boð ella forboð, verða rindaðar av Elnevndini. Endamálið við reglunum er m.a. at skapa størri áeggjan til, at reglumar verða fylgdar.

Ásetingin í uppskotinum kann bert brúkast í mun til elektriskt tilfar.
Reglumar, sum eru í bekendtgørelse nr. 177 af 20. marts 1995 om administration m.v. af stærkstrømsloven, verða eftir uppskotinum tiknar upp í lógina, og heimildirnar verða greiðari, at Elnevndin kann krevja kostnaðirnar fyri uttanhýsis tekniskar kanningar endurrindaðar av viðkomandi, sum í sambandi við kanningina fær fráboðan um boð ella forboð sbrt. §§ 19 og 20, stk. 1-2.

Til § 19
Skotið verður upp, at Elnevndin kann geva boð um at bøta um feilir og manglar við elektriskum tilfari, sum ikki lýkur ásettar reglur sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3 ella trygdarkravið í § 4.

Hetta er nýggj áseting í mun til galdandi lóggávu.

Møguleikin at geva boð um at bøtast skal um feilir og manglar við elektriskum tilfari er minni inntriv enn eitt forboð sbrt. § 20, stk. 1 í uppskotinum. Tað verður viðkomandi at krevja ábøtur í førum, har tað eftir eini proportionalitetsmeting ikki verður mett skilagott at seta forboð fyri t.d. sølu av elektriska tilfarinum, um feilurin ella mangulin rættast við einum minni inntrivandi tiltaki.

Boð um ábøtur kunnu vera bæði viðkomandi í mun til elektrist tilfar, ið longu er selt til brúkara, og í mun til elektriskt tilfar, sum liggur á goymslu.

Til § 20
Skotið verður upp í stk. 1, at Elnevndin kann seta forboð fyri sølu, útflýggjan, innlegging ella brúki av elektriskum tilfari, sum ikki lýkur ásettar reglur sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3 ella trygdarkravið í § 4.

Nærri reglur um eftirlit við elektriskum tilfari eru ásettar í kunngerð nr. 171 frá 21. september 1993 um trygdar- og eftirlitsreglur viðvikjandi eltilfari. Reglurnar í §§ 11 – 14 í bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven verða nýttar við teimum frávikum, sum fylgja av føroyskari lóggávu.

Verður tað við eftirliti av elektriskum tilfari ella aðramáta staðfest, at hetta er ólógligt, kann Elnevndin eftir galdandi reglum seta forboð móti sølu, útflýggjan og innlegging av tilfari av hesum slag til nýtslu her á landi. Tá ið forboð er sett, kann Elnevndin áleggja at taka aftur selt tilfar. Elnevndin kann áleggja seljara o.a. tilfarið afturkallað við almennari lýsing umframt, at Elnevndin kann skipa fyri, at ávaring verður lýst um nýtslu av slíkum ólógligum tilfari.
Eftir áseting í stk. 1 í uppskotinum kann Elnevndin seta forboð fyri sølu, útflýggjan, innlegging ella brúki av elektriskum tilfari, ið ikki lýkur ásettar reglur sbrt. § 5, stk. 1, nr. 3 ella trygdarkravið í § 4.

Við sølu skal skiljast søla frá ítøkiligum handlum, internethandlum, á marknaðum ella líknandi við vinningi fyri eyga. Við útflýggjan skal skiljast í mun til sølu, tilfar, ið ikki er selt við vinningi fyri eyga, men t.d. er útflýggjað ókeypis.

Við forboð fyri innlegging av elektriskum tilfari skal skiljast forboð fyri at leggja inn elektriskt tilfar, sum er selt til hetta endamálið.

Forboð bann venda sær ímóti einhvørjum, og sama um tilfarið annaðhvørt er selt við vinningi fyri eyga ella útflýggjað ókeypis. Einhvør skal skiljast vítt og kann vera tann, sum upprunaliga seldi tilfarið ella ein uppboðssøla, sum bert virkar sum millumliður. Munur verður ikki gjørdur á vinnurekandi og privatum, tá tað t.d. verður viðkomandi at kunna fráboða søluforboð fyri vinnurekandi, meðan tað er meira viðkomandi at fráboða nýtsluforboð fyri einum privatum. Sama forboð kann eisini fráboðast fleiri pørtum, um hetta verður hildið vera neyðugt.

Í samsvari við fyrisitingarrættarligu proportionalitetsmeginregluni skal størri inntriv enn neyðugt fyri at røkka endamálinum ikki verða nýtt. Tað verður altíð tann, sum forboðið er sett fyri, ið skal gjalda tær útreiðslur, ið kunnu hava samband við at ganga forboðnum á møti.
Tað verður eftir eini ítøkiligari meting, um forboðið verður brotið. Elnevndin ger metingina.

Skotið verður upp í stk. 2, at Elnevndin kann áleggja, at elektriskt tilfar, ið er fevnt av forboðnum sbrt. 1, verður tikið aftur av marknaðinum, afturkallað frá brúkarunum ella fyribeint.

Stk. 2 í uppskotinum gevur møguleika fyri at geva boð um, at elektriska tilfarið, ið er fevnt av einum forboði, samstundis verður tikið av marknaðinum. Tað merkir eitthvørt tiltak við tí í hyggju at forða fyri, at vandamikið tilfarð ella tilfar, ið ikki lýkur galdandi reglur, verður markanaðarført.

Somuleiðis ber til at geva boð um, at elektriskt tilfar verður afturkallað frá brúkarum. Við afturkalling skal skiljast eitthvørt tiltak við afturbering í hyggju av vandamiklum tilfari, ið ikki lýkur galdandi reglur, sum áður hevur verið veitt ella gjørt tøkt fyri brúkarum.

Seinasta og mest víðfevnda tiltak er boð um fyribeinan, tí slíkt boð fær munandi fíggjarligar avleiðingar fyri tann, sum boðið er vent til.

Tiltakið verður mett neyðugt í serligum førum, har einki av tiltøkunum omanfyri metast vera nøktandi fyri at beina burtur tann vanda, sum elektriska tilfarið í sjálvum sær er atvold til. Ásetingin kann nýtast í einum føri, har tilfarið er ein vandi í sjálvum sær, soleiðis at bert við at hava tilfarið standandi verður hetta til vanda fyri persónar, húsdjór ella ognir.

§ 20, stk. 2, sum skotin er upp, tekur ikki støðu til keypirættarligar spurningar í sambandi við afturbering av tilfarið, sum t.d. er afturkallað.

Skotið verður uppi í stk. 3, at Elnevndin kann geva boð um, at elektriskt tilfar, sum er fevnt av forboði eftir stk. 1, verður frákoplað.

Tað framgongur av bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven, at metir Elnevndin, at atlitið til trygd brúkarans krevur hetta, kann ásetast, at viðkomandi tilfar ikki longur kann brúkast. Elnevndin kann eisini avgera, at slíkt tilfar skal frákoplast og møguliga takast sundur, um hetta er fast innlagt, og kann í hesum sambandi geva løggildari elinnleggjarafyritøku boð um at taka sundur og taka aftur fast innlagt tilfar.
Stk. 3 í uppskotinum er ætlað at nýta í førum, har t.d. nýtsluforboð ikki er nøktandi til at forða fyri vandanum, men har tað verður mett neyðugt við fleiri tiltøkum, sum t.d. frákopling av elektriskari útgerð.

Skotið verður upp í stk. 4, at Elnevndin kann geva løggildari elinnleggingarfyritøku boð um at frákopla íbundið elektriskt tilfar, um eini boð sbrt. stk. 3 ikki verður fylgd. Elnevndin kann krevja kostnaðin fyri frákoplingina endurrindaðað av viðkomandi, ið hevur fingið fráboðan um boð sbrt. stk. 3.

Ásetingin, ið skotin er upp, kann brúkast í førum, har tann, ið hevur fingið fráboðan um boð eftir stk. 3 í uppskotinum, ikki hevur fylgt boðum um frákopling. Her kann Elnevndin geva løggildari elinnleggingarfyritøku boð um at fremja frákoplingina. Kostnaðirnir, sum Elnevndin hevur í hesum sambandi, kunnu krevjast endurrindaðir av viðkomandi, ið fekk fráboðanina um boð sbrt. stk. 3 í uppskotinum.

Til § 21
Skotið verður upp í § 21, sum nýggja áseting í mun til galdandi lóggávu, at Elnevndin kann geva viðkomandi boð, sum hevur fingið fráboðan um undantak eftir treytum eftir § 6, stk. 1, at halda hesi.

Skotið verður upp, at tá treytir í undantaki eftir § 6, stk. 1 verða settar til viks, verða givin boð heldur enn revsitiltøk. Orsøkin til hetta er, at ynskiligt er, at undantak við treytum verður hildið, og tí verður mett at vera meira gagnligt at geva boð heldur enn at revsa. Sostatt fær tann, ið hevur fingið fráboðan um undantak við treytum, ein møguleika at rætta vantandi hald av treytum fyri undantak. Tí verður fyrst viðkomandi at melda viðurskifti til løgregluna, tá givin boð verða brotin. Mett verður, at slík mannagongd er munadyggasta tiltak at tryggja, at treytir í undantaki verða hildnar.

Til § 22
Skotið verður upp í stk. 1, at Elnevndin kann upplýsa fyri almenninginum um vandan við elektriskum útbúnaðum, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari, tá boð ella forboð eftir §§ 15, 16, 17, stk. 1, 19 og 20, stk. 1-2 eru givin.

Í kunngerð um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi elektriskum tilfari og í § ?14, stk. 5 í fyrsitinarkunngerðini eru nærri reglur um at upplýsa fyri almenninginum um vandan við elektriskum útbúnaðum, elektriskum innleggingum og elektriskum tilfari, tá boð ella forboð eftir §§ 15, 16, 17, stk. 1, 19 og 20, stk. 1-2 eru givin.

Elnevndin kann eftir galdandi reglum gera av, at eitt forboð skal almannakunngerast. Tað er tó ikki hemild til, sum tað annars er eftir fyrisitingarkunngerðini, at kostnaðirnir hesum viðvíkjandi skulu rindast av fyrsta liði í umsetningini í Føroyum, sbr. at tað í kunngerðini um ígildissetan av strekstreymsreglugerðini er ásett, at reglurnar í sterkstreymsreglugerðini um avgjøld ikki skulu nýtast í Føroyum.

Eisini kann eftir galdandi reglum avgerast, at skelti verða sett fram í handlum, sýnisgluggum og líknandi. Eftir kunngerð um trygdar- og eftirlitsreglur viðvíkjandi elektriskum tilfari eftir og í § ?14, stk. 5 í fyrisitingarkunngerðini kann Elnevndin sjálv taka avgerð um at almannakunngera bæði forboð móti sølu av ólógligum tilfari, skyldu at afturkalla tilfar og forboð móti nýtslu av tilfari.

Tað er fleri møguleikar at almannakunngera, t.d. við at leggja upplýsingarnar út á alnetið, upplýsa í bløðum og øðrum fjølmiðlum.

Almannakunngeringin skal innihalda upplýsingar, ið eru hóskandi til at eyðmerkja útbúnaðin, innleggingina ella tilfarið. Stk. 1 í uppskotinum hevur heimild at almannakunngera allar neyðugar upplýsingar til eyðmerking av útbúnaðinum, innleggingini ella tilfarinum.

Skotið verður upp í stk. 2, at Elnevndin í sambandi við upplýsingar eftir stk. 1 bert kann geva viðari upplýsingar, ið hava eyðkenni av handilsloynidómum, tá hetta verður mett neyðugt fyri at verja trygdina hjá brúkarunum.

Eftir uppskotinum til ásetingina hevur Elnevndin skyldu at tryggja, at upplýsingar, ið hava stóran figgjarligan týdning fyri viðkomandi fyritøku, og sum ti kunnu roknast sum handilsloynidómar, ikki verða latnar viðari. Í metingini av hesum hevur Elnevndin skyldu at hoyra viðkomandi fyritøku, og síðani gera eina meting av figgjarliga týdninginum fyri fyritøkuna øðrumegin og brúkaratrygdina hinumegin.

Í teimum førum, har tað er neyðugt við atliti til verju av brúkaratrygdini, verða upplýsingar tó latnar viðari, hóast hesar innihalda handilsloynidómar. Talan verður um heilt serlig føri, har upplýsingarnar, ið ikki kunnu metast sum handilsloynidómar, ikki eru nøktandi fyri at tryggja almenninginum tær upplýsingar, ið gera tað møguligt at sleppa undan, at vandi stendst av hesum. Hinvegin verður ikki talan um serlig føri, tá Elnevndin hevur ítøkiliga vitan um, at viðkomandi fyritøka longu hevur forðað fyri vandanum fyri allar viðkomandi brúkarar.

Til § 23
Eftir § 21 í galdandi løgtingslóg um sterkstreymsútbúnað kann landsstýrismaðurin eftir tilmæli frá Elnevndini heilt ella lutvist avhenda eftirlitið við innleggingum til eigaran ella nýtaran av

teimum útbúnaðum, haðani avvarðandi innleggingar fáa streym. Avhending av eftirliti kann verða tikin aftur, um elnevndini eftir gjørdar kanningar tykir, at eftirlitið ikki verður gjørt nóg væl.

Við uppskotinum verður frameftir eisini møguleiki fyri at heimila netfelagnum at hava eftirlit við innleggingum, men heimildin verður munand víðkað, soleiðis at fleiri av uppgávunum hjá Elnevndini umframt til netfelagið eisini kunnu verða lætnar øðrum myndugleikum ella privatum fyritøkum.

Tað krevst lógarheimild at áleggja privatum, kommunum og kommunalum felagskapum almennar uppgávur. Endamálið við ásetingini í uppskotinum er at fáa umsitingina, undir hesum eftirliti við lóggávuni, í eina meira skipaða og trygga legu.

Kommenterede [HD40]: SEV skilir ásetingina soleiðis, at lógarheimild er fyri at geva t.d. SEV heimild at fremja tær í § 23 nevndu uppgávur, men tað er upp til SEV at avgera hvørt SEV ynskir at átaka sær slíkar uppgávur.

Skotið verður upp, at Elnevndin við góðkenning frá landstýrismanninum kann heimila øðrum myndugleikum, netfelagnum ella øðrum privatum fyritøkum, at fremja eftirlitsuppgávur eftir § 13, stk. 1, hjálpa Elnevndini at fremja eftirlitsuppgávur eftir § 13, stk. 1, ella geva boð ella seta forboð eftir §§ 15, 16, 17, stk. 1, 19 og 20, stk. 1-2 í uppskotinum.

Boð ella forboð, sum eru meiri inntrívandi, t.d. sbrt. § 17, stk. 2 og 3 í uppskotinum at slíta elveitingina fyri eigarans rokning, um brot verður framt á forboð at nýta innleggingina, skulu útinnast av Elnevndini. Eftir § 37, stk. 2 í uppskotinum kunnu avgerðir, sum mynduleiki, netfelag ella privat fyritøka hevur tikið eftir heimiling eftir § 23, kærast til Elnevndina. Elnevndin kann seta krav um, at boð ella forboð innihalda upplýsingar um kærumøguleikar. Elevndin kann í sambandi við eina heimilan eftir stk. 1 seta krav um, at myndugleikin, netfelagið ella privata fyritøkan er akreditterað av DANAK. Viðkomandi myndugleiki, netfelagið ella fyritøka skal gjalda fyri kostnaðir í sambandi við akkreditterin.

Í Danmark eru reglur um akreditterin ásettar í donsku erhvervsfremmeloven. DANAK (Den Danske Akkrediterings- og Metrologifond) er sbrt. lógini tilnevnt, sum nasjonalur akreditteringsstovnur. DANAK hevur sum uppgávu at akkreditera fyritøkur eftir viðkomandi standardum.

Uppskotið um akreditterin skal tryggja, at eftirlitið verður útint av myndugleikum ella fyritøkum við røttu førleikunum, og at støðið á eftirlitinum ikki viknar, við at Elnevndin heimilar øðrum at fremja eftirlitið.

Krav um akreditterin er ein møguleiki, sum kann verða nýttur eftir uppskotinum. Um ein slík skipan skal setast í verk verður kannað nærri og mett um í sambandi arbeiðið at seta ásetingarnar í lógaruppskotinum í verk.

Elnevndin kann, í sambandi við heimilan eftir stk. 1, seta krøv um gegni, um tekniskar førleikar og um ábyrgdartrygging.

Verða uppgávur lagdar til annan mynduleika, netfelagið ella privata fyritøku hava starvsfólk hjá mynduleikanum, netfelagnum ella privatu fyritøkuni tagnarskyldu eftir §§ 152-152 f. í revsilógini.

Verður netfelagið eimilað eftir stk. 1, útinnur Elnevndin eftirlit eftir hesi lóg við útbúnaðum og innleggingum hjá netfelagnum. Elnevnin kann fáa sær uttanhýsi hjálp at útinna eftirlitið.

.

Til § 24
Eftir uppskotinum verður málsøkið, eltrygd, eins og eftir galdandi lóg, lagt undir eina kollektiva leiðslu, eina nevnd, í staðin fyri at gera nýggjan stovn undir landstýrismanninum við einum stjóra og starvsfólkum undir honum við neyðugum eltrygdartekniskum førleikum, ella at leggja tað til ein verandi stovn. Endamálið við hesum er at fáa sakkunnleika og áhugapartar við yrkiskunnleika við í umsitingina av lógini, tí økið er eyðkent av umfatandi og nágreiniligum reglum um tekniska eltrygd. Víst verður til viðmerkingarnar í uppskotinum til sterkstreymslógina (álitið, s. 3, og s. 41 frá 1993 frá táverandi Elnevnd, sum gjørdi uppskotið til lógina, og sum varð lagt við sum skjal til lógaruppskotið frá landsstýrinum til Løgtingið, løgtingsmál 132/1992):

"Ein treyt fyri, at fyrisitingin kann hava innlit í sterkstreymøkið, og atknýtt øki, er, at sakkøn hjálp er tøk hjá fyrisitingini. Slík sakkøn hjálp verður best veitt av eini nevnd. Nevndin má vera varandi, tá hjálp ikki bert skal verða veitt í sambandi við gerð av nágreiniligum reglum, men eisini við at ráðgeva fyrisitingina og vísa á, hvørjar nýggjar ásetingar ella striking av gomlum eru neyðugar at gera, orsakað av teknisku menningini. Nevndin kann eisini útinna yvirskipaðað eftirlitið við sterkstreymúbúnaði, skipa fyri góðkenning av eltilfari o.a."

Landsstýrismaðurin hevur eftir galdandi lóg og eftir uppskotinum yvirskipaðu ábyrgdina av uppgávunum á eltrygdarøkinum, meðan ítøkliga umsitingin eftir galdandi lóg og eftir uppskotinum verður lagt til Elnevndina.

Elnevndin er sostatt partur av fyrisitingarligu skipanini undir landsstýrismanninum. Møguleikarnir hjá landsstýrismanninum at skipa fyrisitingina, og at geva nevndini boð eru tó avmarkaðir í tann mun, at hetta fylgir av ásetingunum í lógaruppskotinum. Av hesum fylgir m.a., at landsstýrismaðurin ikki kann leggja uppgávurnar viðvíkjandi eltrygd til annan myndugleika, sbr. tó § 23 í uppskotinum, at hann ikki kann geva ítøkilig boð, tá tað snýr seg um ítøkiligar fyrisitingarligar avgerðir. Hetta kemst av, at meginparturin av teimum avgerðum, ið Elnevndin tekur um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar, verður av tekniskum slagi og treyta munandi tekniskt innlit á økinum, sum ikki kann væntast, at stjórnarráðið hevur. Tí verður mett, at stjórnarráðið vanliga ikki hevur førleika at fremja eina veruliga viðgerð av møguligum kærum.

Nevndin skal eftir uppskotinum verða sett saman sum í dag við einum formanni, ið skal vera lógfrøðingur, rakstrarleiðaranum fyri SEV, stjóranum fyri Landsverk, einum góðkendum elinnleggjara, sum Føroya Hanverksmeistarafelag tilnevnir, og einum limi við elfrøðiligari útbúgving. Landsstýrið tilnevnir formannin og seinast nevnda lim. Eftir galdandi lóg er tað Føroya elinnleggjarafelag, sum tilnevnir limin við elfrøðiligari útbúgving. Tað felagið er ikki til longur, og nevndu persónar eru í dag limir í Føroya Handverksmeistarafelag

Nevndin er eftir uppskotinum samansett, fyri at hava innlit í økið, eltrygd og menningina á økinum og fyri at hava serliga sakkøn við í umstingini av lógini og í gerð av reglum í lóg og kunngerðum og samstundis geva áhugapørtum, SEV, elinnleggjarum ávirkan á, at tað framhaldandi kann haldast eitt høgt eltrygdarstøði.

Eftir uppskotinum hevur Elnevndin eftirlit við, at ásetingarnar í lógini verða hildnar. Ætlanin er tó ikki, at nevndin sjálv skal fremja allar eftlitsuppgávurnar, men at hesar kunnu verða lagdar til ein annan myndugleika, netfelagið ella privata fyritøku, sbr. § 23 í uppskotinum og viðmerkingarnar til ta ásetingina, meðan nevndin skal hava yvirskipaðu ábyrgdina av arbeiðinum við eltrygd, undir hesum innanfyri ásettu fíggjarkarmarnar skipa og raðfesta

uppgávurnar, gera uppskot til nýggjar reglur, taka støðu til frávik, vera kærumynduleiki, taka lut í norðurlendska samstarvinum um eltrygd o.a.

Eisini verður skotið upp, at tað undir Elnevndini verður skipað avgreiðsluskrivstova eftir nærri avgerð nevndarinnar og góðkenning landsstýrimansins.

Til § 25
Ásetingin samsvarar við redaktionellum broytingum við § 8 í galdandi lóg og snýr seg um trygdartiltøk o.a. fyri at sleppa undan, at sterkstreymsútbúnaðir órógvar raksturin av øðrum virkjum, ið eru.

Til § 26
Ásetingin samsvarar við redaktionellum broytingum til § 12 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um at leggja sterkstreymsleiðingar yvir og undir gøtur og vegir, um mannagongdir í hesum sambandinum og um ognartøku.

Til § 27
Ásetingin samsvarar við redaktionellum broytingum til § 13 í galdandi lóg, sbr. tó viðmerkingarnar niðanfyri.

Ásetingin snýr seg um ognartøku av fastari ogn til at leggja undir ella oman á jørð leiðingar við mastrum, transformarastøðum o.t., ið hoyra til, tá ið útbúnaðurin er ætlaður til býti av elmegi til spenningar niðan fyri 50kV.

Í § 13, stk. 4 í galdandi lóg er ásett, at Elnevndin kunnger 2 reisur í Kunngerðablaðnum og umframt á slíkan hátt, sum eftir viðurskiftunum á staðnum verður hildið at vera mest hóskandi, at umsóknin um ognartøku er fingin og við tilskilan av innihaldinum í umsóknini og hvørji rættindi ynskt verður at fáa.

Sambært § 1 í kunngerð um almennt talgilt kunngerðablað kunnu bert løgtingslógir, kunngerðir og aðrar almennar fyriskipanir lýsast í Kunngerðarblaðnum. Umsóknir, sum nevndar eru í § 27, kunnu tí ikki kunngerðast í Kunngerðarblaðnum.

Skotið verður tí upp, at Elnevndin kunnger 2 reisur í landsumfatandi almennum blað ella bløðum, Kunngerðaportalinum og umframt á slíkan hátt, sum eftir viðurskiftunum á staðnum verður hildið at vera mest hóskandi, at umsóknin um ognartøku er fingin og við tilskilan av innihaldinum í umsóknini, og hvørji rættindi ynskt verður at fáa.

Kommenterede [HD41]: Kunngerðarportalurin er ikki nevndur í tekstinum í § 27.

Til § 28
Ásetingin samsvarar við redaktionellum broytingum til § 14 í galdandi lóg, sbr. tó viðmerkingarnar niðanfyri. Ásetingin snýr seg um, at í sambandi við gerð av útbúnaðum, sum koma undir § 27, hevur tann, ið eigur býtisútbúnaðin, heimild at gera neyðugar fyrireikandi uppmátingar og onnur tøknilig fyrireikingararbeiði og kanningar.

Í § 14, stk. 3 í galdandi lóg er ásett, at teir skaðar, ið standast av arbeiðinum, skulu verða endurgoldnir. Fæst ikki semja um støddina á endurgjaldinum, verður hetta ásett av Elnevndini. Avgerðin hjá elnevndini kann verða skotin inn fyri landsstýrið. Skotið verður upp, at kærumøguleikin til landsstýrismannin verður strikaður.

Til § 29
Ásetingin samsvarar við redaktionellar broytingar til § 15 í galdandi lóg.

Ásetingin snýr seg um tingingar um viddina á tí, sum skal ognartakast eftir § 27, og at spurningurin um støddina á endurgjaldinum verður skotin inn fyri gerðararætt til ásetingar.

Til § 30
Ásetingin samsvarar við redaktionellar broytingar til § 16 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um gerðarrættin eftir § 29.

Til § 31
Ásetingin samsvarar við redaktionellar broytingar til § 17 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um, hvussu eigarin av útbúnaðinum rindar endurgjald.

Til § 32
Ásetingin samsvarar við redaktionellar broytingar til § 18 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um, at úrskrift av tí, ið farið er fram í Elnevndini, kann nýtast sum prógv um, at rættindi til ogn hjá øðrum persóni eru fingin.

Til § 33
Ásetingin samsvarar við redaktionellar broytingar til § 19 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um ognartøku til útbúnað til framleiðslu, flyting, býti og goymslu av elmegi. Tó er "goymslu av elmegi" lagt afturat við tað, at lógarøkið eftir uppskotinum eisini fevnir um goymslu av elmegi.

Til § 34
Ásetingin samsvarar við § 20 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um, at eigarin av útbúnaðinum ber allan kostnað av starvi við meira eftir §§ 25-33.

Til § 35
Skotið verður upp í stk. 1, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at reglur sbrt. lógini, sum innihalda krøv til fyritøkur, elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriskt tilfar o.a, og tekniskar nærlýsingar, ið víst verður til í slíkum reglum, verða ikki settar í Kunngerðarportalin.

Í § 2, stk. 5 í sterkstreymlógini er ásett, at tær teknisku reglurnar, sum landsstýrismaðurin ella Elnevndin hevur ásett og teknisku og umsitingarligu reglurnar í sterkstreymsreglugerðini sleppa undan upptøku í Kunngerðarblaðnum.

Ásetingin er eitt framhald av § 2, stk. 5 í galdandi lóg.

Bakstøðið fyri hesum er, at reglurnar fyrst og fremst eru tekniskar reglur, sum innihalda nógv nágreinilig teknisk krøv.

Viðkomandi teknisku reglur og teknisku nærlýsingar eru næstan bert ætlaðar einum lítlum skara av professionellum, sum brúka reglurnar í vinnu teirra. Tær eru bert í sera avmarkaðan mun ætlaðar privatpersónum uttan fyri nevnda professionella skara.

Skotið veður upp í stk. 2, at landsstýrismaðurin ásetur reglur um, hvussu kunning um innihaldið av teimum reglum og teknisku nærlýsingunum, sum ikki verða settar í Kunngerðaportalin, sbr. stk. 1, verða almannakunngjørdar.

Elnevndin kunnar um innihaldið í reglunum t.d. á heimasíðuni hjá nevndini. Er talan um standardar, verða hesir til keyps frá Dansk Standard.

Skotið verður upp í stk. 3, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at tekniskar nærlýsingar, sum ikki verða settar í Kunngerðaportalin, sbr. stk. 1, skulu vera galdandi, hóast hesar ikki eru á føroyskum ella donskum.

Uppskotið er grundað á, at fyriskipanirnar eisini venda sær til fyritøkur, ið arbeiða altjóða, har arbeiðsmálið er annað enn føroyskt ella danskt. Í fleiri av hesum førum er vanligt og ofta fakliga neyðugt við atliti til teknisk og málslig frábrigdi o.a., at teknisku nærlýsingarnar verða nýttar á upprunamálinum, sum oftast er enskt. Sostatt er í roynd og veru ikki tørvur á, at teknisku nærlýsingarnar eru á føroyskum ella donskum, um tær upprunaliga eru skrivaðar á einum øðrum máli, og eingin spyr eftir umseting av nærlýsingunum.

Til § 36
Í § 9, stk. 1 í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin) er ásett, at loyvi krevst frá landsstýrismanninum til netvirksemi, t.e. flutningur av ravmagni frá framleiðslustaði til brúkara. Loyvið verður latið við treytum, ið landsstýrismaðurin ásetir. Í § 9, stk. 2 í somu lóg er ásett, at SEV fær loyvi til netvirksemi eftir stk 1.

Skotið verður upp, at fyritøkan, sum hevur fingið netloyvi eftir § 9 í elveitingarlógini, skal rinda eitt árligt gjald til figging av útreiðslunum til umsitingina av eltrygdarlógini í tann mun, tær ikki verða rindaðar av gjøldum o.a.

Tað merkir í royndum, at gjaldið verður álagt SEV, sum er einasta netfelag eftir § 9, stk. 2 í elveitingarlógini.

Sama skipan um árligt gjald á netfelagið til figging av útreiðslunum til umsitingina av elveitingarlógini, er heimilað í § 17, stk. 2 í lógini, og eru nærri reglur ásettar í kunngerð nr. 121 frá 22. desember 2008 um gjald fyri umsitingina av elveitingarlógini. Ásetingin í uppskotinum samsvarar við ásetingarnar í nevndu kunngerð.

Gjaldið verður játtað á løgtingsfiggjarlógini. Samsvarandi verða eisini allar útreiðslur til umsitingina av lógini játtaðar á løgtingsfiggjarlógini.

Útreiðslurnar hjá SEV av eftirlitinum við nýggjum elektriskum innleggingum verða í dag rindaðar av brúkarum av elektrisiteti frá SEV yvir elprísirnar. Útreiðslurnar eru uml. 3-4 mió. kr. um árið.

Viðvíkjandi metingini av útreiðslunum til umsitingina av uppskotinum verður vist til pkt. 2.1 um figgjarligar avleiðingar.

Tað er ikki gjørd nøkur nýggj meting av kostnaðinum av at umsita økið.

SEV kann sum higartil krevja útreiðslurnar frá brúkarum av elektrisiteti frá SEV yvir elprísirnar.

Til § 37

Skotið verður upp í stk. 1, at avgerðir, sum Elnevndin hevur tikið eftir hesi lóg ella reglum, sum eru settar í gildi sbrt. lógini, ikki kunnu leggjast fyri annan fyrisitingarligan myndugleika. Sostatt kunnu avgerðir, sum Elnevndin hevur tikið í ítøkiligum málum, eftir uppskotinum ikki kærast til landsstýrismannin og heldur ikki til t.d. Vinnukærunevndina. Meginparturin av teimum avgerðum, ið Elnevndin tekur um elektriskan útbúnað, elektriskar innleggingar og elektriska tilfar, verður av tekniskum slagi og treyta munandi tekniskt innlit á økinum, sum ikki kann væntast, at stjórnarráðið hevur. Tí verður mett, at stjórnarráðið vanliga ikki hevur førleika at fremja eina veruliga viðgerð av møguligum kærum.

Skt. 1 í uppskotinum forðar ikki fyri vanligu atgongdina, at fáa avgerðir royndar við dómstólarnar.

Skotið verður upp í stk. 2, at avgerðir, tiknar av tí, sum Elnevndin hevur heimilað sbrt. § 23, stk. 1, kunnu leggjast fyri Elnevndina.

Avgerðir, ið eru tiknar av tí, sum Elnevndin hevur heimilað sbrt. § 23, stk. 1, skulu eftir vanligum fyrisitingarligum reglum innihalda upplýsing um kærumøguleika.

Freistin at senda inn kæru er 4 vikur at rokna, frá at kæran er fráboðað viðkomandi.

Til § 38

Skotið verður upp í stk. 1, at revsingin fyri brot á ásetingarnar í uppskotinum er sekt, um ikki harðari revsing ábyrgdast eftir aðrar lóggávu. Víst verður í høvuðsheitum til kap. 25 í revsilógini um brot á lív og likam. Sostatt er ikki møguleiki fyri at døma varðhaldsrevsing sbrt. ásetingunum í uppskotinum.

Við áseting av stødd á sektini verður revsilógarinnar § 80, stk. 2 og § 81, sbrt. lógarkunngerð nr. 215 af 24. juni 1939, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 30. apríl 2018, at nýta.

Sum nýggja áseting, verður skotið upp í stk. 1, nr. 1, at um ikki strangari revsing er uppiborin eftir aðrari lóggávávu, verður tann revsaður við sekt, ið tilætlað fremur brot á §§ 3 ella 4 í uppskotinum.

Tað gongur fram av § 18, stk. 2 í bekendtgørelse om administration m.v. af stærkstrømsloven, at brot á ásetingarnar í kunngerðini, undir hesum forboð og boð, sum verða sett sbrt. kunngerðini, eisini verða revsað við sekt. Tað gongur eisini fram av § 5 a, stk 1 í somu kunngerð, at sterkstreymsútbúnaðir skulu gerast og rekast soleiðis, at hesir ikki seta trygdina í vanda fyri persónar, húsdýr ella ognir. Samsvarandi gongur fram av § 10, stk. 1 í somu kunngerð, at elektriskt tilfar skal verða framleitt á ein slíkan hátt, at tað ikki setur trygdina í vanda fyri persónar, húsdýr ella ognir, tá ið tað rætt innlagt og hildið við líka og verður nýtt í samsvari við endamáli við tí.

Verandi trygdarkrøv eru sostatt revsiáløgd. Endamálið við nýggju ordingini er, at tað bert eru tilætlað brot á trygdarkravið í §§ 3-4 í lógaruppskotinum, sum skulu vera revsiáløgd.

Tá tilætlan verður kravd eftir stk. 1, nr. 1 í uppskotinum, er hetta tí, at §§ 3 og 4 eru av slíkum slag, at tað bert eigur at verða revsað fyri brot, har tað er greitt fyri tann vinnurekandi, at ásetingin í royndum varð brotin.

Tað kann koma fyri, at elektriskur útbúnaður, elektrisk innlegging ella elektriskt tilfar kann vera til vanda fyri persónar, húsdjór ella ognir, og sostatt vera í stríð við kravið í §§ 3 ella 4, hóast hesi eru gjørd ella framleidd samsvarandi einum standardi, og sostatt áttu at verið trygg. Um hetta er førið, og vinnurekandi hevur verið vitandi um hetta, skal ein slík tilætlað gerð kunna revsast. Um tann vinnurekandi hevur gjørt ein útbúnað ella innlegging ella framleitt tilfar í teirri trúgv, at hetta var trygt, tí tað var gjørt ella framleitt í samsvari við ein standard, verður viðkomandi hinvegin ikki revsaður fyri brot á §§ 3 ella 4.

Gerningsinnihaldið í ásetingini er sostatt gerðin av elektriska útbúnaðinum, elektrisku innleggingini umframt framleiðslu av elektriska tilfarinum. Gerningsinnihaldið er realiserað, tá gerð av útbúnaði ella innlegging ella framleiðslan, innflutingur ella søla av elektriskum tilfari hava havt við sær vanda fyri persónar, húsdjór ella ognir. Hetta kann t.d. staðfestast, tá tað í sambandi við gerð av elektriskari innlegging eru íkomnir feilir, sum hava havt eldsbruna við sær. Annað dømi er, tá tað í sambandi við framleiðslu av elektriskum tilfari eru íkomnir feilir, sum hava elvt til elektriskan stoyt. Gerningsinnihaldið er tvíliðað, tá tað skal vera ein feilur við gerð ella framleiðslu, sum hevur við sær vanda fyri annaðhvørt persónar, húsdjór ella ognir.

Sum nýggj áseting verður skotið upp í stk. 1, nr. 2, at um ikki harðari revsing er uppiborin sbrt. aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt, sum setur til viks upplýsingarskylduna í § 13, stk. 2 í uppskotinum.

Tá Elnevndin biður um upplýsingar sbrt. § 13, stk. 2 í uppskotinum, eru upplýsingarnar av stórum týdningi fyri, at Elnevndin kann útinna eftirlitsvirksemi sítt. Ofta er sera umráðandi fyri Elnevndina at kunna taka skjóta avgerð, um ein útbúnaður, innlegging ella tilfar er vandamikið, og tí skulu ynsktu upplýsingarnar verða givnar uttan óneyðugar seinkingar. Fær

Elnevndin ikki kravdu upplýsingarnar, kann tað forða Elnevndini at fremja eftirlit.

Tí er neyðugt, at tá upplýsingarskyldan verður sett til viks, verður revsað við sekt við atliti til fyribyrgjandi virknaðin.

Um illgruni er um, at upplýsingar ikki verða givnar, tí hesar fara at vísa, at viðkomandi hevur framt eitthvørt revsivert, kann revsiásetingin í uppskotinum ikki hondhevjast. Málið má í staðin latast løgregluni til nærri rannsakan.

Skotið verður upp í stk. 1, nr. 3, at um ikki harðari revsing er uppiborin sbrt. aðrari lóggávu, verður tann revsaður við sekt, ið ikki lýkur boðum ella brýtur forboð sbrt. §§ 16, 17, 18, stk. 1-2, 19, 20, stk. 1-4 og 21.

Sbrt. § 5, stk. 1, nr. 2 í galdandi lóg um sterkstreymsútbúnað verður tann revsaður við sekt, ið letur vera við at lýða forboð ella boð, ið eru fráboðað sbrt. lógini ella fyriskipanum, ið eru settar eftir lógini.

Endamálið við stk. 1, nr. 3 í uppskotinum er ikki at broyta møguleiknan at revsa undanlát at lýða boð ella brot á forboð. Ásetingin er nágreinað soleiðis, at tað gongur greitt fram, hvørji boð og forboð, ásetingin snýr seg um.

Tað er avgerandi fyri eftirlit Elnevndarinnar, at fráboðað boð verða aktað og fráboðað forboð lýdd. Ásetingin skal sostatt tryggja, at boð og forboð verða munadygg, og at áeggjan er fyri at akta boðum og forboðum Elnevndarinnar.

Skotið verður upp í stk. 2, at tað í fyriskipanum, ið eru ásettar sbrt. § 5, kann ásetast revsing við sekt fyri brot á ásetingar í fyriskipanunum.

Sbrt. § 5, stk 2 í galdandi sterkstreymslóg kann í fyriskipanum, sum verða settar sbrt. lógini, verða ásett revsing við bót fyri brot móti ásetingum í fyriskipanunum.

§ 5 í uppskotinum inniheldur heimildir til, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum og um elektriskt tilfarð, gerð og rakstur av øðrum skipanum nærhendis ella í sambandi við elektriskan útbúnað ella elektriskar innleggingar umframt krav um skjalprógvan.

Í hesum førum er tað viðkomandi at kunna seta revsiásetingar. Tað merkir, at tað í t.d. í kunngerðum um trygdarteknisk krøv til elektriskar innleggingar kann ásetast, at tann, ið gerð innleggingar í stríð við trygdarteknisk krøv, kann revsast við sekt.

Landfútin hevur í ummælisskrivi víst á, at Føroyska rættargangslógin framvegis í § 721 ger skilnað millum politmál og statsadvokatmál, og at tað tí kann verða tørvur á, at tað í sambandi við revsimál fyri brot á lógina kann verða tørvur á, at tað í revisásetingini í 38 verður sett, at tey í rættargangslógini nevndu tiltøk í kap. 69 um handtøku, kap. 70 um fongsling, kap. 72 um rannsókn og kap. 73 um inndrátt kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum. Hetta er sostatt ásett Í § 38, stk. 3. Líkandi áseting er í § 7, stk. 5 í vápnalógini.

Til § 39
Skotið verður upp í § 39, at feløg o.a. (løgfrøðiligir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd sbrt. reglunum í kap. 5 í revsilógini.

Uppskotið til ásetingina samsvar við § 5, stk. 3 í galdandi lóg og hevur til endamáls at staðfesta, at løgfrøðiligir persónar kunnu áleggjast revsing sbrt. kap. 5 í revsilógini.

Til § 40
Skotið verður upp, at fyrningarfreistin fyri revsiábyrgdina er 10 ár.

Uppskotið er í samsvari við § 5, stk. 4 í galdandi sterkstreymslóg.

Til § 41
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2021.

Til § 42
Skotið verður upp í § 43, at reglur, sum eru settar í gildi sbrt. sterkstreymslógini, verða verandi í gildi, til hesar verða settar úr gildi ella verða avloystar av reglum sbrt. hesi lóg.

Tekniski parturin av reglugerðini verður sostatt í sterkstreymsreglugerðini í gildi, til nýggjar kunngerðir taka reglugerðina av ella partar av henni.

Ætlanin er, at fyri gerð og rakstur av elektriskum útbúnaði og elektriskum innleggingum, skal ein partur av galdandi sterkstreymsreglugerð í eini skiftistíð kunna verða nýttur.

Tað snýr seg um niðanfyri nevndu partar av sterkstreymsreglugerðini, sum í eini skiftistíð verða verandi í gildi, sbr. kunngerð nr. 117 frá 19. juli 2019 um sterkstreymsreglugerð o.a.

Til § 43
Skotið verður upp í § 43, at landsstýrismaðurin kann áseta skiftisreglur.

Mett verður, at tørvur er á skiftisreglum í sambandi við skifti til nýggju lóggávuna, soleiðis at vinnan fær møguleika at tillaga seg til nýggju reglurnar og møguleikar á eløkinum.

Tørvur á skiftisreglum kann ikki metast í løtuni, men verður mett um og støða tikin til tað í sambandi við gerð av teimum kunngerðunum, sum skulu koma í staðin fyri verandi sterkstreymsreglugerð.

Roknað verður við, at uppskot til kunngerðir kunnu verða sendar til ummælis seinni í hesum árinum.

Kommenteret [HD42]: Neyðugt er at hava orðað uppskot til kunngerðir og skiftisreglur fyri at kunna viðgera lógaruppskotið á einum upplýstum og forsvarligum grundarlagi, eins og gjort var, tá ið øki var dagført í 1993.

Kommenteret [HD43]: Hví ikki fáa hetta gjort beinanvegin, soleiðis at lógaruppskotið verður viðgjørt tá uppskot til kunngerðir fyriliggja og greitt er hvussu øki ætlandi skal skipast og hvør mettur kostnaður stendst av hesum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 6. januar 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen